| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>31. januar 2019 | Blað nr.: 13 |
| | Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** 31. januar 2019 **Kl**. 18:00
**Stað**: Býráðssalurin
**Málsnr: 3/18-24/18**

**FUNDARLEIÐARI:**
Annika Jacobina Olsen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Helena á Dam Neystabø
Tróndur Sigurðsson
Halla Samuelsen
Annfinn Brekkstein
Jákup Dam
Marin Katrina Ragnarsdóttir Frýdal
Bjørghild Djurhuus
Gunvør Balle
Turið Horn
Bergun Kass
Bjørg Dam
Sjúrður Johan Olsen

**LUTTÓKU EISINI:**
Eyðna Justinussen
Jóan Petur Hentze
Marius Muller
Sigurð Ó. Vang
Eyðfríð Jacobsen

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**
Magnus Dam

| | | |
|---|---|---|
| Býráðsfundur<br>31. januar 2019 | Blað nr.: 14 | |
| | Formansins merki: | |

Innihaldsyvirlit — Síða

## Til viðgerðar


| | | | |
|---|---|---|---|
| 3/19 | 19/00102-1 | Bogi Andreasen: farloyvi frá býráðnum | 16 |
| 4/19 | 19/00098-1 | Mál beind í nevndir 2019 | 17 |
| 5/19 | 14/00896-7 | Víðkan av Skansabryggjuni og Eystara havnaøki | 18 |
| 6/19 | 19/00083-1 | Bátahylur í Álakeri | 30 |
| 7/19 | 14/01884-38 | Afturtøka av grundstykkið matr. nr. 135cp, Hoyvík | 32 |
| 8/19 | 19/00224-1 | Leigumál - Lonin í Hoydølum til fyribils dagstovn | 34 |
| 9/19 | 18/02538-8 | Kommunufelagið : Fyrispurningur um kommunala samstarvið á eldraøkinum | 37 |
| 10/19 | 14/04756-36 | Tórshavnar Golfklubbi: Umsókn um stuðul til byggjan av golfvølli og felagshúsi gl. j. nr. 10/27.1991 (1999-1642) | 41 |
| 11/19 | 19/00144-1 | Játtan í 2019 til smærri ítróttaanlegg v.m. | 48 |
| 12/19 | 16/04764-5 | Ólavur S. T. Thorsteinsson : Umsókn vegna Skatefelagið um stuðul til eina innandura skatepark | 50 |
| 13/19 | 16/03313-8 | Klintrifelag Føroya | 56 |
| 14/19 | 16/02772-1 | 06-12 Málslýsing - Hoyvíkar skúli dagføring | 62 |
| 15/19 | 17/00846-3 | Hølisviðurskifti o.a. - Havnar Telvingarfelag | 65 |
| 16/19 | 17/03498-2 | Gøtunavn til innkoyringarveg frá Glyvursvegi til “Undir Kongavarða” og “Við Klingurstjørn” | 68 |
| 17/19 | 15/00865-1 | Val av limum í valstýrið fyri løgtings- og fólkatingsval á Argjum | 71 |
| 18/19 | 18/03848-1 | Staðseting av nýggjum og víðkan av verandi dagstovnum 2019 | 72 |
| 19/19 | 17/03594-2 | Umsókn um broyting av byggisamtykt til A1 øki í samband við makaskifti millum matr. nr. 157 og matr. nr. 92a, Kollafirði | 77 |
| 20/19 | 18/04229-1 | Broyting av almennu byggisamtyktini, Dalurin Langi, matr. nr. 138a, Hoyvík frá A3 til D1 | 80 |
| 21/19 | 15/01465-2 | Bústaðir. Umsókn um at leiga part av Kommunuskúlanum til lestraríbúðir. | 83 |
| 22/19 | 19/00427-1 | Golfvøllur – broyting av byggisamtykt | 90 |
| 23/19 | 19/00411-1 | Útboð av útbygging av Býlingshúsinum Vesturi á Flat | 93 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 24/19 | 19/00412-1 | Útboð av útbygging av Dagstovninum á Hamrinum, Argir | 95 |

## ***3/19 Bogi Andreasen: farloyvi frá býráðnum***

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 31.01.2019 | 3/19 | 19/00102-1 |

**Málslýsing:**
Bogi Andreasen hevur boðað frá, at honum berst frá at røkja starv sítt sum býráðslimur í meira enn samfullar 14 dagar.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunulógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Sjúrður Olsen, eru loknar.

**Býráðsfundur 31. januar 2019:** Einmælt samtykt.

# 4/19 Mál beind í nevndir 2019

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 31.01.2019 | 4/19 | 19/00098-1 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 31. januar 2019:** Einmælt samtykt.

# 5/19 Víðkan av Skansabryggjuni og Eystara havnaøki

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 16.06.2014 | 28/14 | 14/00896-7 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.06.2014 | 166/14 | 14/00896-7 |
| 3 Býráðsfundur | 25.06.2014 | 139/14 | 14/00896-7 |
| 4 Vinnunevndin | 12.01.2015 | 3/15 | 14/00896-7 |
| 5 Vinnunevndin | 20.01.2015 | 4/15 | 14/00896-7 |
| 6 Fíggjarnevndin | 21.01.2015 | 24/15 | 14/00896-7 |
| 7 Býráðsfundur | 29.01.2015 | 18/15 | 14/00896-7 |
| 8 Vinnunevndin | 20.04.2015 | 11/15 | 14/00896-7 |
| 9 Býráðsfundur | 23.04.2015 | 72/15 | 14/00896-7 |
| 10 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 29.04.2015 | 35/15 | 14/00896-7 |
| 11 Vinnunevndin | 18.05.2015 | 12/15 | 14/00896-7 |
| 12 Vinnunevndin | 24.09.2015 | 29/15 | 14/00896-7 |
| 13 Vinnunevndin | 12.10.2015 | 36/15 | 14/00896-7 |
| 14 Vinnunevndin | 14.10.2015 | 37/15 | 14/00896-7 |
| 15 Fíggjarnevndin | 21.10.2015 | 249/15 | 14/00896-7 |
| 16 Býráðsfundur | 29.10.2015 | 180/15 | 14/00896-7 |
| 17 Vinnunevndin | 17.12.2015 | 48/15 | 14/00896-7 |
| 18 Vinnunevndin | 29.12.2015 | 49/15 | 14/00896-7 |
| 19 Vinnunevndin | 07.03.2016 | 8/16 | 14/00896-7 |
| 20 Vinnunevndin | 01.08.2016 | 27/16 | 14/00896-7 |
| 21 Fíggjarnevndin | 04.08.2016 | 252/16 | 14/00896-7 |
| 22 Býráðsfundur | 04.08.2016 | 196/16 | 14/00896-7 |
| 23 Fíggjarnevndin | 16.11.2016 | 393/16 | 14/00896-7 |
| 24 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 82/17 | 14/00896-7 |
| 25 Vinnunevndin | 14.01.2019 | 5/19 | 14/00896-7 |
| 26 Fíggjarnevndin | 23.01.2019 | 3/19 | 14/00896-7 |
| 27 Býráðsfundur | 31.01.2019 | 5/19 | 14/00896-7 |
| 28 Fíggjarnevndin | | | 14/00896-7 |

## Málslýsing:

**Víðkan av Skansabryggjuni og Eystara havnaøki.**
Seinasta stóra havnaútbyggingin í Tórshavn, var liðug í 1997, tá tann uttasti parturin av molanum varð breiðkaður. Hendan útbyggingin bleiv gjørd í tøkum tíma, tí bingjuflutningurin er støðugt vaksin síðani.

Síðani útbyggingina í Tórshavn í 1997, er havnarlagið í Kollafirði munandi útbygt. Útbyggingarnar í Kollafirði og á Oyrareingjum hava skapt nógv virksemi. Tørvurin á størri útbyggingum er ikki akuttur í løtuni, men hann kann vísa seg seinni.

Undantikið tað, sum verður uppskipað á Oyrareingjum, kemur allur innflutningur til Føroyar, sum kemur við bingjum og trailarum, um bryggjuna í Tórshavn. At bingjuhavnin liggur í Tórshavn ger, at flutningurin til nógv tann størsta partin av forbrúkarunum er stuttur.

Verðandi umstøður á Eystaru bryggju eru langt frá optimalar, tí:

- **Dýpið fram við Eystara mola og innsiglingin er ov lítið**. Hetta viðførir at tá verðandi bingjuskip liggja við bryggju, er neyðugt at leggja fendarar millum skipið og bryggjuna. Hetta er ikki nøktandi, og ger tað ómøguligt at fáa størri bingjuskip til bryggju, enn tey verðandi.
Alt fleiri ferðamannaskip, sum sigla á okkara leiðum, kunnu ikki koma til bryggju, tí dýpið er ov lítið.
- **Kajplássið, serliga um summarið, er sera avmarkað.** Hetta merkir at vit ikki kunnu avgreiða ferðamannaskipini og bingjuskipini samstundis, og tað er ómøgulig at vaksa um møguligt annað virksemi.
- **Økið til bingjur og trailarar er ov lítið.** At økið til bingjur og trailarar er ov lítið, viðførir at arbeiðsgongdin ikki er nøktandi og tað blíva alt ov nógvar flytingar.
- **Økið til pakkhús o.a. er ov lítið.** Fyri ikki at minka um verðandi bingjuøki, ber ikki til at byggja goymslubygningar o.a. sum tørvur er á til havnavirksemið.
- **Økið til avgreiðslu av ferðafólki og bilum er ov lítið.** Tað er ov lítið pláss at avgreiða ferðafólk og bilar, serliga um summarið. Ein víðkan av havnaøkinum, hevði gjørt tað møguligt at umskipa økið rundan um farstøðina, soleiðis at betri pláss var til tey ferðandi.

Einasti møguleiki at betra munandi um umstøðurnar á Eystaru bryggu í Tórshavn, er at leingja molan á Skansabryggjuni, og at víðka verðandi øki suðureftir og eystureftir.

**Tilmæli frá havnarmeistaranum:** Mælt verður til:
- at býráðið velur 2 býráðslimir í bygginevndina
- at bygginevndin ger byggiprogram.
- beinanvegin at seta í verk árinskanning, hydrauliskar kanningar og at fáa til vega neyðug loyvir.
- at kanningar og fyrireikingar, upp til 3 mió. verða goldnar av íløgukarminum hjá Tórshavnar havn.

**Vinnunevndin 30. mai 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 30. mai 2013:** Einmælt samtykt at taka undir við vinnunevndini.

**Býráðið fyri læstum hurðum 30. mai 2013:** Fyrst varð atkvøtt um tilmæli frá Marin Katrinu Frýdal, um at beina málið í teknisku nevnd, ið fall við einari atkvøðu fyri og 9 ímóti.

Fyri atkvøddi: Marin Katrina Frýdal

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Bjørghild Djurhuus, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen

Greiddu ikki atkvøðu: Elin Lindenskov, Hela Dam á Neystabø og Jákup Dam

Síðan varð atkvøtt um tilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.
Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Bjørghild Djurhuus, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen, Elin Lindenskov, Hela Dam á Neystabø og Jákup Dam

Greiddi ikki atkvøðu: Marin Katrina Frýdal

At enda varð atkvøtt um tilmæli frá Heðin Mortensen, um at velja Sjúrður Olsen og Tróndur Sigurdsson í bygginevndina, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen og Jákup Dam.

Greiddu ikki atkvøðu: Marin Katrina Frýdal og Elin Lindenskov.

**Bygginevndin hevur havt 10 fundir, og hevur hesar viðmerkingar:**

**Grótbrot:** Grótið til uppfyllingina, sum er umleið 80.000 $m^2$ verður tikið á sama stað sum til seinastu havnaútbyggingina, við at víðka verðandi grótbrot á Glyvursnesi suðureftir.
Yvirfriðingarnevndin hevur góðkent, at grótbrotið verður víðkað.
Avtala um gróttøku er ikki gjørd við Búnaðarstovuna enn.

**Aldusimuleringar:** DHI hevur gjørt aldusimuleringar av, hvussu kyrt tað verður í tí nýggju- og verðandi havnini , tá útbyggingin er liðug. Kanningarnar vísa, at kyrran í tí nýggju havnini verður umleið tann sama, sum tað er í verðandi havn í dag. Kanningin vísir eisini, at aftan á ýtbyggingina, verður tað munandi kyrrari í verðandi havn.
Útbyggingin hevur eisini ein positiva ávirkan á Álaker og Argir, serliga á landnyrðingi.

**Grótkast:** Fyri at kunna taka støðu til hvussu sjálvt grótkastið skal byggjast , eru ávegis kanningar gjørdar hjá DHI.
Ávegis kanningarnar vísa, at tann norðari parturin av grótkastinum skal vera nakað hægri enn verðandi moli.
Fyri at fáa endaliga staðfest, hvussu uppbyggingin av molanum skal verða, er neyðugt at gera eina modelroynd, sum verður liðug í september 2014.

**Sandagerð:** Kanningar vísa, at útbyggingin ikki hevur nevniverduga ávirkan á sandin í Sandágerði.

**Havnalagið:** Fyri at fáa skapið á havnalagnum at hóska so væl til landslagið sum til ber, er nógv orka, saman við arkitekti, brúkt upp á at fáa tað rætta skapið.
Uppskotið er ein samlað víðkan av havnalagnum upp á umleið 163.000 $m^2$, við einari atløgusíðu upp á umleið 700 m

**Skansin:** Fyri at fáa eina so góða loysn sum til ber, hevur verið samskift við Fornminnisnevndina.
Tað hevur verið týdningarmikið, at umhvørvið rundan um Skansan, aftan á útbyggingina, skal verða eitt trivnaðarøki.
Nýggja havnalagið er umleið 50 m leyst av fjøruni undir Skansanum, har møguleiki er at leggja smábátar.

**Friðingarmyndugleikar:** Yvirfriðingarnevndin hevur á fundi 10. juni 2014 samtykt at geva loyvi til útbyggingina.

**Árinskanning:** Tá bygt verður so út á sjógv, er neyðugt at gera eina árinskanning. Hetta er ein umfatandi kanning, sum lýsir hvørja ávirkan útbyggingin hevur á umhvørvið.
Rambøl hevur gjørt kanningina, sum aftaná at býráðið hevur samtykt tað, verður send til umhvørvisstovuna.
Tað er Umhvørvisstovan sum endaliga góðkennir ætlanina.

**Broyting av byggisamtykt:** Neyðugt verður at víðka verðandi byggisamtykt til eisini at fevna um nýggja havnalagið. Uppskot um hetta, eigur sum skjótast at verða lagt fyri nevnd.

**Framhaldandi fyrireiking:** Fyri at kunna gera tær endaligu fyrireikingarnar áðrenn støða verður tikin til at projektera, er neyðugt at gera modelroynd av nýggja molanum.
Eisini er neyðugt at gera byggiprogram.

Tað eru áður jattaðar 3 mió til fyrireikingar. Neyðugt er at játta 1 mió. afturat, soleiðis at møguligt er gera modelroyndina og byggiprogrammið.
Hetta arbeiðið eigur at verða liðugt í oktober.

**Tilmæli:**
Havnameistarin og bygginevndin mæla til at samtykkja, at VVM kanningin verður send til Umhvørvisstovuna til góðkenningar, tá hon er liðug.

Mælt verður eisini til at játta 1 mió. av íløgukarminum hjá Tórshavnar havn til fyrireiking og ger av byggiprogrammi.

**Vinnunevndin 16. juni 2014:** Samtykt taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 18. juni 2014:** Samtykt at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 25. juni 2014:** Fyrst varð atkvøtt um tilmæli frá Marin Katrinu Frýdal, um at beina málið í teknisku nevnd, fall við 3 atkvøðum fyri og 7 ímóti.

Fyri atkvøddu: Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge og Jákup Dam

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen

Greiddu ikki atkvøðu: Elin Lindenskov, Helena Dam á Neystabø og Sigrún Mohr,

Síðan varð atkvøtt um tilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri og 1 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Elin Lindenskov, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen, Jógvan Arge og Jákup Dam

Ímóti atkvøddu: Marin Katrina Frýdal.

**Ískoyti:**
**Støðulýsing**
**Árinskanningin,** hevur verið til hoyring. Viðmerkingar til hoyringsskrivini verða í løtuni viðgjørd. Tá viðgerðin er liðug, verður hon løgd fyri býráðið, og eftirfylgjandi send til Umhvørvisstovuna til endaliga góðkenning.

**Modelroyndin,** sum vísir hvussu grótkastið skal uppbyggjast er liðug.

**Byggiprogrammið** er gjørt.

Um arbeiðið skal kunna bjóðast út í 2015, má projekteringin byrja nú. Uppskot til avtalu um projektering er gjørt við LBF, soleiðis at arbeiðið kann bjóðast út í innbodnari lisitatión.

**Tilmæli:** Havnarmeistarin og bygginevndin mæla til at samtykkja uppskot til byggiprogram.

Eisini verður mælt til at játta 6 mió. kr. til projektering og forkanningar.

**Vinnunevndin 12. januar 2015:** Útsett.

**Vinnunevndin 20. januar 2015:** Ein meiriluti: Sjúrður Olsen, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein og Bjørghild Djurhuus tekur undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

Ein minniluti: Jákup Dam tekur ikki undir við tilmælinum, men mælir til at samtykkja, at aðrir møguleikar fyri víðkaðari góðshavn í kommununi verða gjølla kannaðir við atliti at kostnaði og umstøðum annars, áðrenn byggiskrá verður samtykt og peningur játtaður til at projektera ætlaðu útbygginina av Skansabryggjuni og Eystara havnarøki í Havn. Víst verður til framløgd skitsuuppskot d.d. um havnarbygging á Sundi.

**Fíggjarnevnd 21. januar 2015:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Sjúrður Olsen og Annfinn Brekkstein, tekur undir við meirilutanum í vinnunevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Jógvan Arge, mælir býráðnum til at taka undir við minnilutanum.

**Býráðsfundir 29. januar 2015:** Fyrst varð atkvøtt um minnilutatilmæli frá fíggjarnevndini, ið fall við 3 atkvøðum fyri og 10 ímóti.

Fyri atkvøddu:
Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam og Jógvan Arge.

Ímóti atkvøddu:
Heðin Mortensen, Rúni Djurhuus, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen.

Síðan varð atkvøtt um meirilutatilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og 3 ímóti.

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Rúni Djurhuus, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen.

Ímóti atkvøddu:
Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam og Jógvan Arge.

**Ískoyti:**

Árinskanningin lá frammi til hoyringar í tíðarskeiðinum frá 26. juni til 19. september 2014, og inn komu 7 hoyringsskriv.
Ein samlað viðmerking til hoyringsskrivini er gjørd í "hvidbog", sum saman við árinskanningini verður send til Umhvørvisstovuna til endaliga góðkenning.

**Tilmæli:**
Havnameistarin mælir til at taka undir við viðmerkingunum í "hvidbog" og at senda hesar til Umhvørvisstovuna til endaliga góðkenning.

**Vinnunevndin 20. april 2015:** Ein meiriluti **:** Sjúrður Olsen, tróndur Sigurðsson, og Annfinn Brekksteintekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti: Jákup Dam tekur ikki undir við tilmælinum, men vísir til minnilutatilmælið frá vinnunevndini 20. januar 2015.

**Býráðsfundir 23. apríl 2015:** Atkvøtt varð um tilmæli frá Heðin Mortensen, um at taka undir við vinnunevndini og at senda málið í náttúru- og umhvørvisnevndina, áðrenn málið verður sent Umhvørvisstovuni, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørg Dam, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Rúni Djurhuus, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen.

Greiddi ikki atkvøðu: Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

**Ískoyti:**
Uppskot til serstaka byggisamtykt er gjørd fyri økið (okkara j.nr. 15/00833), og liggur uppskotið alment frammi í 6 vikur til fyrst í juni, síðani skulu møguligar innkomnar viðmerkingar viðgerast.
Uppskotið til byggisamtykt liggur á heimasíðuni hjá kommununi.

Skjøl:
14/03771-13 VVM umhvørvisárinsmeting
14/03771-14 Samandráttur av VVM umhvørvisárinsmeting
14/03771-6 Kort yvir kloakkir
14/03771-9 Viðmerkingar frá náttúru- og umhvørvisdeildini
**Náttúru- og umhvørvisnevndin 29. apríl 2015:** Málið umrøtt.

**Vinnunevndin 18. mai 2015:** Málið varð umrøtt.

**Ískoyti:**
Býráðið samtykti á fundi tann 29. januar 2015, at játta pening til projektering.
Forprojekt er gjørt.

Fyri at kunna taka avgerð um, hvørjir arbeiðstakarar hava førleika at gera arbeiðið, er fragast at hava eina undangóðkenning.
Tað tekur tíð at hava eina undangóðkenning.

Í tilfarinum til undangóðkenning eigur at verða kunnað um, hvussu stóran prosentpart av kostnaðinum arbeiðstakarin skal seta sum bankatrygd. Í ABF er ásett, at arbeiðstakarin skal seta eina trygd upp á 15%.

Tað er ikki óvanligt í okkara grannalondum, at trygdin er 10% og minni. Ein annar leistur er, at trygdin verður ásett til 10% og at 5% av hvørjari umbøn verður eftirhildin.Um krav um trygd er ov høgt, kann tað blíva trupult hjá føroyskum arbeiðstakarum at bjóða.

**Tilmæli frá havnarmeistaranum og bygginevndini:**
 Mælt verður til:
- at góðkenna forprojektið.
- at lýsa til almenna undangóðkenning.
- at arbeiðstakarin skal seta ein bankatrygd upp á 10% av sáttmálaupphæddini og at 5% av hvørjari umbøn verður eftirhildin.

**Vinnunevndin 24. september 2015:**
Eini meiriluti: Sjúrður Olsen, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen og Sigrún Mohr mælir til at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti: Jákup Dam tekur ikki undir við tilmælinum.

**Vinnunevndin 24. september 2015:**
Eini meiriluti: Sjúrður Olsen, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen og Sigrún Mohr mælir til at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti: Jákup Dam tekur ikki undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Málið hevur nú í longri tíð verið í Yvirfriðingarnevndini og Býarskipanarnevnd Landsins, uttan at nøkur avgerð verður tikin. Orsøkin til hetta tykist fyrst og fremst at vera árinið ætlanin hevur á útsýnið frá Skansanum.

Fyri at fáa gongd á málið er politisk avgerð tikin um, at minka ætlanina.

Tann broytta ætlanin førir við sær, at útfyllingin frammanfyri Skansan verður tikin burtur og økið minkar við 70.000 $m^2$.

Broytta ætlanin ger, at øll ferðslan til havnarøkið verður leidd eftir verðandi til- og frákoyring.

Broytingin viðførir eisini, at økið til pakkhús og avgreiðslu minkar munandi. Fyri at bøta um hetta, ber til at vaksa útbyggingina vestureftir við 15.000 $m^2$.

Broytta ætlanin og óvantaðar kanniningar av botninum gera, at neyðugt er at játta 1 mió. kr afturat til projektering.

**Tilmæli:**
Havnameistarin mælir til at tillaga projektið sambært nýggju ætlanini, og at játta 1 mió. afturat til projektering.

**Vinnunevndin 12. oktober 2015:** Útsett.

**Vinnunevndin 14. oktober 2015:**

Ein meiriluti: Sjúrður Olsen, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein og Bjørghild Djurhuus tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti: Jákup Dam tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2015:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen, taka undir við vinnunevndini og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðsfundir 29. oktober 2015:** Tjóðveldi legði fram soljóðandi broytingaruppskot: Minnilutin ásannar, at nýggja ætlanin er øðrvísi enn tann fyrra, men so leingi Yvirfriðingarnevndin ikki hevur tikið støðu til loyvið til nýggju ætlaninina, mælir minnilutin frá at játta fleiri pengar til at projektera ætlaðu havnaútbyggingina.

Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskotið frá Tjóðveldi, ið fall við trimum atkvøðum fyri og 9 ímóti. Ein býráðslimur greiddi ikki atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Jógvan Arge Marin Katrina Frýdal og Jákup Dam.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Sigrun Mohr, Halla Samuelsen, Sjúrður Olsen, Annfinn Brekkstein og Bogi Andreasen.

Elin Lindenskov greiddi ikki atkvøðu.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri og trimum ímóti. Ein býráðslimur greiddi ikki atkvøðu.

Tey, ið atkvøddu fyri, vóru: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Sigrun Mohr, Halla Samuelsen, Sjúrður Olsen, Annfinn Brekkstein og Bogi Andreasen.

Tey, ið atkvøddu ímóti, vóru: Jógvan Arge, Marin Katrina Frýdal og Jákup Dam.

Elin Lindenskov greiddi ikki atkvøðu.

**Ískoyti:**
Lýst hevur verið til undangóðkenning av at bjóða upp á arbeiðið.
Átta ymisk feløg/samtøk ynsktu at verða við, og lótu tilfar inn.

**Tilmæli:**
Havnarmeisarin og bygginevndin mæla til at bjóða fylgjandi feløgum og samtøkum at geva tilboð upp á arbeiðið:
Feløg: J& K Petersen, MT Højgaard.
Samtøk: Articon & Aarsleff, TG Verk & Suðurverk, Munck & JV-OHL, LNS & LNS Saga.

**Vinnunevndin 17. desember 2015:**
Ein meiriluti: Sjurður Olsen, Annfinn Brekkstein og Bjørghild Djurjuus tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti: Jákup Dam tekur ikki undir við tilmælinum vísandi til at Yvirfriðingarnevndin ikki hevur tikið støðu til nýggju ætlanina.

**Ískoyti:**

Í fráboðan frá Yvirfriðingarnevndini, dagfest 23. desember 2015, verður sagt, at nevndin á fundi tann 14. desember 2015 hevur tikið avgerð um, at grótkastið undir Skansanum skal flytast góðar 30 m suðureftir. Hetta merkir at uppskotið, sum bleiv samtykt á býráðsfundi 29 oktober 2015, minkar við umleið 10.000 $m^{2}$.

**Tilmæli:**
Havnameistarin mælir til at tillaga projektið sambært avgerðini hjá Yvirfriðingarnevndini, og at bjóða arbeiðið út.

**Vinnunevndin 29. desember 2015:**
Ein meiriluti: Sjúrður Olsen, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti: Jákup Dam tekur ikki undir við tilmælinum, vísandi til at ongin dagførd byggiskrá fyriliggur til nógv broytta uppskotið og tí eru nógvar óvissur.

**Ískoyti:**
Á fundi í vinnunevndini tann 24. september 2015 bleiv samtykt, at arbeiðstakarin skal seta ein bankatrygd upp á 10% av sáttmálaupphæddini og at 5% av hvørjari umbøn verður eftirhildin.
Ráðgevin heldur, at ásetingin um at afturhalda 5% av hvørjari umbøn, eigur at verða strikað. Grundgevingin er, at ein lutfalsliga lítil partur av kostnaðinum er levering av tilfari, og at tað er tyngjandi fyri gjaldførið, serliga hjá teimum smærru fyritøkunum, at 5% av hvørjari umbøn verður afturhildið.

**Tilmæli frá bygginevndini:** Mælt verður til at arbeiðstakarin skal seta eina bankatrygd upp á 10% av sáttmálaupphæddini, og at ásetingin um at 5% av hvørjari umbøn verður afturhildin, verður strikað.

**Vinnunevndin 07. mars 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá bygginevndini.
Eisini samtykt, at føroyskir sáttmálar eru galdandi fyri útbjóðingina.

**Vinnunevndin 07. mars 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá bygginevndini.
Eisini samtykt, at føroyskir sáttmálar eru galdandi fyri útbjóðingina.

**Ískoyti:**
Licitatiónin var tann 22/3- 2016, kl. 13.30. Inn komu 5 tilboð:

Tilboð A og B eru fyri bryggju við ávikavist 15 m og13 m dýpi.

| | Tilboð | Upphædd |
|---|---|---|
| J & K Petersen | A | 386.826.599 |
| | B | 371.641.338 |
| Samt. Articon & Aarsleff | A | 448.758.725 |
| | B | 425.843.654 |
| MT Højgaard | A | 593.872.000 |
| | B | 572.000.000 |
| Samt. TG Verk & Suðurverk | A | 793.864.643 |

| | | |
|---|---|---|
| | B | 770.129.797 |
| Samt. LNS Saga & LNS | A | 505.219.402 |
| | B | 488.709.925 |

Lisitatiónsprokokol og innstilling er gjørd j.nr. 14/00896-39

Uppskot til avtalu er gjørt við Búnaðarstovuna og bóndan um at keypa 91.979 $m^2$ av lendi á Glyvursnesi til gróttøku. Tá liðugt er at taka grót, er Tórshavnar kommuna eigari av grótbrotinum, og kann brúka hetta til annað endamál.
Avtalað er eisini, at ein vegur skal gerast oman fyri grótbrotið fyri at sleppa til avgrevstur frá grótbrotinum. Vegurin verður liggjandi aftan á at liðugt er at taka grót.
Eisini er avtala gjørd fyri ampar, sum bóndin hevur av arbeiðinum, og at møguligt annað virksemi kemur í grótbrotið, sum liggur í haganum.
Samlaður kostnaður fyri keyp av lendi, mist vetrarbit og ampar er tilsamans kr. 8.958.516 sí j.nr. 14/00896-40

Fíggjarlig viðurskiftir:
Sambært uppgerð j.nr.14/00896-41 er samlaði kostnaðurin fyri arbeiðið 465 mió. kr.
Arbeiðið skal fíggjast av íløgum fyri Tórshavnar havn í 2016, 2017, 2018 og 2019.
Láni tørvurin er 300 mió. kr.
Bæði útlendskir og føroyskir fíggingarstovnar hava givið tilboð upp á lán.
Ein hóskandi afturgjaldsprofilur fyri Tórshavnar havn er 20 ár. Nú rentan er lág, er tað helst rættast at gera avtalu um fasta rentu fyri 250 mió fyri tey fyrstu 15 árini, og variabla rentu fyri 50 mió. Hetta ger, at vit kenna útreiðslurnar øll tey fyrstu árini áðrenn lánið er niðurgoldið, og at møguleiki er at niðurgjalda lánið við tí variablu rentuni skjótari enn ætlað.
Tilboð er komið upp á lán, við nevnda profili. Tað fæst áleið eins bílig fígging í Føroyum sum uttanlands.
Tá eins bílig fígging fæst í Føroyum í mun til uttanlands, er tað helst rættast at taka av tí føroyska tilboðnum, sum eisini ger prosessina og samskifti munandi lættari. sí j. nr 14/00896-42

**Tilmæli:** Bygginevndin og havnarmeistarin mæla til,
- at játta 465 mió. kr av íløgum fyri Tórshavnar havn í 2016, 2017, 2018 og 2019.
- at taka av tilboð A frá P/F J.& K. Petersen, og at gera byggisáttmála.
- at taka undir við uppskoti um avtalu við Búnaðarstovuna og bóndan um grót av Glyvursnesi

Havnarmeistarin mælir eisini til at gera lániavtalu um 250 mió við fastari rentu, og 50 mió við variablari rentu. Lánini verða avdrigin yvir 20 ár.

**Vinnunevndin 01. august 2016:** Ein meiriluti, Sjúrður Olsen, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein og Bjørghild Djurhuus, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Jákup Dam, tekur ikki undir við tilmælinum og vísir til viðmerkingarnar á vinnunevndarfundi 29. desember 2015.

**Fíggjarnevndin 04. august 2016:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Sjúrður Olsen, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein tekur undir við vinnunevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur undir við Jákup Dam í vinnunevndini. Jógvan Arge vísir býráðnum á, at ongin lýsing er løgd fram av árinunum, sum íløgan og tann stóra lántøkan hava á búskap kommununar.

**Býráðsfundur 04. august 2016:** Fyrst varð atkvøtt um tilmæli frá Tjóðveldi, um at útseta avgerðina um at útbyggja Skansabryggjuna, til nýtt býráð hevur tikið við 1. januar 2017, ið fall við 3 atkvøðum fyri og 7 ímóti.

Fyri atkvøddu:
Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal

Ímóti atkvøddu:
Heðin Mortensen, Helena Dam á Neystabø, Sigrun Mohr, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen

Greiddi ikki atkvøðu:
Halla Samuelsen

Síðan varð atkvøtt um meirilutatilmæli í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 8 atkvøðum fyri og einari ímóti.

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Helena Dam á Neystabø, Sigrun Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen

Ímóti atkvøddu:
Marin Katrina Frýdal.

Greiddu ikki atkvøðu:
Jógvan Arge og Jákup Dam.

**Ískoyti:**
Avgerð bleiv tikin á býráðnum tann 4. august 2016, um at upptaka lán upp á 250 mió. til eina fasta rentu.
Avtalan um fasta rentu fylgir rentumarknaðinum, og var tá 1,74 %.

Endaliga lánsavtalan var klár til undirskrivingar 2. nov. 2016.

Síðani samtyktina í býráðnum, er swappurin hækkaður spakuliga uppeftir, serliga aftan á amerikanska forsetavalið.

Um lánið verður undirskrivað nú, er tann fasta rentan pr. 15.11.2016 , 2,1%

Øll tekin eru til, at rentan framhaldandi hækkar.

**Tilmæli:**
Havnarmeistarin mælir til, at lánið verður tikið beinanvegin.

**Fíggjarnevndin 16. november 2016:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Val av bygginevnd til havnaútbyggingina.

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Vald vórðu Boði Andreasen, Bergun Kass og Heðin Mortensen.

**Ískoyti:**
Áðrenn arbeiðið at víðka Eystara havnarøki byrjaði, vóru 91.979 $m^2$ av lendi keyptir frá Búnaðarstovuni til gróttøku.

Vit kenna ikki tað endaligu nøgdina fyrr enn arbeiðið er liðugt, men tað sær út til, at tað fara umleið 300.000 $m^3$ meira av gróti í útfyllingina enn mett, og er tað tí tørvur á at keypa 9.500 $m^2$ afturat.
Kostnaðurin fyri keyp og tinglýsing er tkr. 885

**Tilmæli frá havnarmeistaranum:**
Mælt verður til at keypa 9.500 $m^2$ fyri tkr 885, at fíggja av íløgujáttanini til víðkan av Skansabryggjuni og víðkan av Eystara havnarøki.

**Vinnunevndin 14. januar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 23. januar 2019:** Samtykt at taka undir við Vinnunevndini og beina málið í býráðið. Marin Katrin Frýdal luttók ikki í viðgerðini.

**Býráðsfundur 31. januar 2019:** Einmælt samtykt.

# 6/19 Bátahylur í Álakeri

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 14.01.2019 | 3/19 | 19/00083-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 23.01.2019 | 4/19 | 19/00083-1 |
| 3 Býráðsfundur | 31.01.2019 | 6/19 | 19/00083-1 |

**Upprunin til málið: Upprunin til málið:**
Býráðið hevur í fíggjarætlanini fyri 2019 avsett 2 mió kr til at fyrireika bygging av bátahyli í Álakeri.
Tað hevur verið tørvur á fleiri bátaplássum í Tórshavn í nógv ár. Við ársenda 2018 vóru tað 200, sum stóðu á bíðilista til bátapláss, og sum øll hava goldið kr. 2.000 í depositum.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í Tórshavn og á Argjum eru tilsamans 550 bátapláss. Tað hava ymiskar ætlanir verið frammi um at gera bátahavn, men ongin hevur borið á mál.
Síðani simuleringar vóru gjørdar av bátahyli í Álakeri í 2006, er havnarlagið nógv útbygt, og tann nýggi molin kemur nógv longur vestur. Simuleringar vísa, at havnaútbyggingin betrar um kyrruna í Álakeri.
Nýggj simulering eigur at verða gjørd, áðrenn farið verður víðari.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Í byggisamtyktini er økið lagt av til havnarøki.
Tá bygt verður út á sjógv, skal loyvi fáast frá friðingarmyndugleikunum.
Umhvørvisstovan tekur støðu til árins- og umhvørviskanning.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Tað er Tórshavnar kommuna, sum rindar fyri íløgur í smábátahavnir. Á fíggjarætlanini fyri 2019 eru avsettar 2 mió. til smábátahavn í Álakeri.
Metingar av einari bátahavn í Álakeri vísa, at tað verður pláss fyri millum 200- og 250 bátum, alt eftir bátastødd og hvussu havnin verður skipað við flótibrúgvum.
Eitt tað fyrsta, sum má gerast, er at gera simulering av Álakeri, fyri at vita um- og hvussu tað ber til at fáa tað kyrt. Kostnaðurin fyri at gera eina simulering er kr. 200.000

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**
Loyvi má fáast frá friðingarnevndini.
Umhvørvisstovan tekur støðu til árins- og umhvørviskanning.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri | Fyri ávís | Fyri ávísar | Fyri |
|---|---|---|---|---|

| | Tórshavnar kommunu | økir í kommununi | samfelagsbólkar ella felagsskapir | vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Mælt verður til at gera byggiprogram.
Eisini verður mælt til at gera simuleringar, at fíggja av íløgum fyri bátahyl í Álakeri.

**Vinnunevndin 14. januar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 23. januar 2019:** Samtykt at taka undir við vinnunevndini.

**Býráðsfundur 31. januar 2019:** Einmælt samtykt.

# 7/19 Afturtøka av grundstykkið matr. nr. 135cp, Hoyvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 23.01.2019 | 9/19 | 14/01884-38 |
| 2 Býráðsfundur | 31.01.2019 | 7/19 | 14/01884-38 |

**Upprunin til málið:**
Talan er um eitt sethúsagrundstykki í Gillagøtu í Hoyvík.
Eigarin keypti grundstykkið 18.11.97, grundstykkið liggur óbygt.
Kommunan hevur rykt uppá byggifreist. Málið er handað Advokatfelagnum at heinta inn.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Eigarin vil lata grundstykkið innaftur, og hevur undirskrivað skeytið, har kommunan yvirtekur grundstykkið aftur fyri 271.974 kr., sum er upprunaprísurin. Peningur skal flytast á klientkonto hjá Advokatfelagnum.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin í stjórnarskrivstovuni mæla til at keypa grundstykkið aftur fyri kr. 271.974 kr.

Tá skeytið er tinglýst til kommuna, verður grundstykkið selt í fríari sølu hjá ognarmeklara.

**Fíggjarnevndin 23. januar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 31. januar 2019:** Einmælt samtykt.

# 8/19 Leigumál - Lonin í Hoydølum til fyribils dagstovn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 14.01.2019 | 1/19 | 19/00224-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 15.01.2019 | 2/19 | 19/00224-1 |
| 3 Býráðsfundur | 16.01.2019 | 1/19 | 19/00224-1 |
| 4 Býráðsfundur | 31.01.2019 | 8/19 | 19/00224-1 |

**Upprunin til málið:**
Áleikandi tørvurin á fleiri dagstovnaplássum, sí eisini mál 17/03897 Bráðfeingis tørvur á dagstovnaplássum og mál 18/03521 Útvega fleiri dagstovnapláss

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Sum lýst í omanfyri nevndu málum, eru fleiri útbyggingar í gerð og aðrar eru í ætlan, sum yvir eitt tvey ára tíðarskeið skulu al tryggja nóg mikið av dagstovnaplássum.

Fyri at nøkta plásstørvin, meðan bygt verður, hevur fyrisitingin kannað møguleikan at leiga skúlalonina í Hoydølum, matr.nr. 18, árini 2019-2020, ið nú stendur tóm.

Uppskot til leigusáttmála við Mentamálaráðið/Landsverk fyriliggur. Onnur loyvi frá byggimyndugleika, friðing og øðrum eru ávegis.

Mett verður, at lonin er serstakliga væl egnað til fyribils dagstovn og kann rúma uml. 100 børnum. Gerast skulu bert smávegis tillagingar. Útiøkið verður skipað hóskandi til endamálið.

Ætlanin er at byrja dagstovnavirksemið 1. februar 2019.

Lonin her í vár verður brúkt sum dagstovnur til øll tey, sum bíðað eftir, at ymsu byggiloysnirnar verða lidnar. Støðan í løtuni er tann, at foreldur hava fingið pláss í Dagstovninum Fríðriksgarði, Býlingshúsinum í Maritugøtu og Býlingshúsinum Inni á Gøtu at byrja her í januar, februar og mars, men hesar byggingar eru allar seinkaðar.

Fríðriksgarður verður tikin í nýtslu 1. mars. Býlingshúsið Inni á Gøtu væntast liðugt síðst í apríl og Býlingshúsið í Maritugøtu væntast liðugt síðst í mai. Tey kunnu sostatt fáa bjóðað pláss í Hoydølum ímeðan. Talan er um uml. 50 børn, um øll taka av.

Vísandi til ætlanirnar at byggja Býlingshúsið Vesturi á Flat út við fýra stovum (uml. 64 pláss um 2 vg-stovur og 2 bg-stovur) og Dagstovnin á Hamrinum út við tveimum stovum (uml. 32 pláss um 1 vg-stova og 1 bg-stova), so ber til, so skjótt einstøku málini eru samtykt at byggja, at bjóða hesi plássini út í BARN, og at børnini so byrja í lonini í Hoydølum, meðan bygt verður.

Fyribilsdagstovnurin í Hoydølum hugsast eisini loysa annan trupulleika á stovnum, har ov nógv barnagarðsbørn eru inni, og sum tí forða fyri, at BARN fær bjóðað vøggustovubørn á viðkomandi stovnum út. Hugsanin er, at elstu børnini á stovninum møta á vanliga stovninum, men at tey halda til í lonini part av degnum.

Dagstovnaleiðararnir, har børnini hava fingið pláss, vara av starvsfólkum og børnum í Lonini í Hoydølum. Aftrat verður samskipari á staðnum.

Fígging:
Á kontu 2810 fíggjarligt fríplass er í 2018 ein væntað minninýtsla uppá uml. kr. 1,85 mió. Til tess at fíggja leigusáttmálan fyri árið 2019 og til aðrar útreiðslur í sambandi við víðkan av stovnskapasitetinum, harundir keyp av útgerð o.ø., verður skotið upp at flyta kr. 1,85 mió av kontu 2810 Fíggjarligt fríplass til kontu 3215 Aðrar útreiðslur barnaansing, har aðrir leigusáttmálar á dagstovnaøkinum eisini verða fíggjaðir.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Dagstovnalógin.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Umsókn er send byggideildini um nýtsluloyvi. Onnur loyvi skulu fáast til vega frá Umhvørvisstovuni, friðingarmyndugleikum v.m

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
17/03897 Bráðfeingis tørvur á dagstovnaplássum
18/03521 Útvega fleiri dagstovnapláss
17/03061 Útinna forkeypsrætt til ognina Kurla

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
.

**Skjøl**
Leigusáttmáli, bygningstekningar v.m.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla mentamálanevndini til at samtykkja, at lonin í Hoydølum verður skipað sum fyribils dagstovnur og at mæla býráðnum um fíggjarnevndina til at góðkenna uppskotið til leigusáttmála og at flyta kr. 1,85 mió av kontu 2810 Fíggjarligt fríplass til kontu 3215 Aðrar útreiðslur barnaansing ætlað til gjald fyri leigusáttmála og aðrar útreiðslur í sambandi við víðkanina av plásskapasitetinum.

**Mentamálanevndin 14. januar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 15. januar 2019:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið i býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 16. januar 2019:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

**Býráðsfundur 31. januar 2019:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

# 9/19 Kommunufelagið : Fyrispurningur um kommunala samstarvið á eldraøkinum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Eldranevndin | 21.08.2018 | 8/18 | 18/02538-8 |
| 2 Eldranevndin | 14.01.2019 | 1/19 | 18/02538-8 |
| 3 Fíggjarnevndin | 23.01.2019 | 11/19 | 18/02538-8 |
| 4 Býráðsfundur | 31.01.2019 | 9/19 | 18/02538-8 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Kommunufelagið hevur í skrivi dagf. 27. juni 2018 boðað frá, at eftirmetingin av løgtingslóg nr. 20 um kommunalt samstarv um heimatænastu, eldrarøkt v.m. er framskundað til 2018. Upprunaliga skuldi lógin eftirmetast í 2020.

Serliga eru tað markamótini millum land og kommunur, afturberingarleisturin og lógarásetingar um kommunalu samstørvini, sum skulu eftirmetast.

Byrjað verður við eftirmeting av *Løgtingslóg um kommunalt samstarv um heimatænastu, eldrarøkt v.m.*

Heilsu- og innlendismálaráðið, sum varar av løgtingslóg um kommunalt samstarv um heimatænastu, eldrarøkt v.m., ger hesa eftirmeting í samráð við Kommunufelagið.

Kommunufelagið spyr í omanfyrinevnda skrivi Tórshavnar kommunu og tey kommunalu samstørvini hvørjar møguligar broytingar kommunurnar og kommunalu samstørvini mæla til at gera í nevndu lóg.

Serliga skulu kommunurnar svara upp á spurningin, hvørt tær framhaldandi ynskja, at tað er eitt lógarkrav, at kommunurnar skipa seg í kommunal samstørv (§§ 4 og 5) ella um kommunurnar ynskja, at henda áseting verður broytt, soleiðis at eldraøkið verður lagt til einstøku kommununa uttan nøkur krøv um samstarv.

Freist at svara kommunufelagnum er 7. sept. 2018.

Heilsu- og umsorganartænastan viðmerkir, at Tórshavnar kommuna er ein kommuna og er tí ikki partur av nøkrum samstarvi. Mett verður ikki, at kommunan hevur tørv á ella ynski um at fáa broytingar.

Tórshavnar kommuna metir tó, at tørvur er á, at fáa ásetingar um, hvussu økið skal skipast tá ein borgari í einari kommunu/kommunusamstarvi ynskir at flyta búpláss úr einari kommunu/kommunusamstarvi til búpláss aðra kommunu/kommunusamstarvi. Hetta øki er hvørki regulerað í lóg um heimatænastu og heimarøkt v.m. ella í lóg um kommunalt samstarv um heimatænastu og eldrarøkt v.m.

Kommunurnar hava einans skyldu at veita búpláss til borgarar í egnari kommunu. Tað hava síðani eldraøkið var yvirtikið av kommununum verið nøkur dømir, har borgarar hava ynskt at

flutt frá røktarbúplássi í øðrum kommunusamstarvi til búpláss í Tórshavnar kommunu og umvent.

Borgarar í kommununi eru teir, sum eru tilmeldaðir fólkaskrásetingini í kommununi. Hetta letur seg illa gera, tí røktarkrevjandi borgarar fysiskt ikki kunnu flyta uttan so, at tað er beinleiðis frá einum røktarheimi til eitt annað.

Í mun til sjálvsavgerðarrættin reisir hetta somuleiðis spurningar, tí borgarin so at siga er stavnsbundin í teirri kommunu, hann einaferð hevur fingið búpláss, hóast familja og onnur t.d. flyta til aðra kommunu.

Í Danmark er hetta økið reguleráð soleiðis, at borgarin sjálvur kann velja, hvar hann ynskir búpláss og flytur gjaldið við honum úr fráflytingarkommununi.

Ein líknandi skipan í Føroyum, vildi ført við sær at fíggingin/gjaldið av búplássinum, hvørki frá frá- ella tilflytingarkommununi verður ein spurningur.

Viðheft er skrivi frá Kommunufelagnum dagf. 27. juni 2018, lóg um kommunalt samstarv um heimatænastu, eldrarøkt v.m. og uppskot til skriv til Kommunufelagið.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/læттar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin og fulltrúin í Heilsu- og umsorganartænastuna mæla eldranevndini til at taka undir við, at hoyringssvari frá Tórshavnar kommunu verður í samsvar við omanfyristandandi.

**Eldranevndin 21. august 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Heilsu- og umsorganartænastan fær fleiri og fleiri umsóknir og fyrispurningar frá avvarðandi, ið ynskja at foreldur teirra flyta úr røktarheimi/stovni í aðrari kommunu til eldrabústovn í Tórshavnar kommunu. Somuleiðis hevur verið dømi, har borgari á bústovni í Tórshavnar kommunu hevur ynskt at flyta til bústovn í øðrum kommunusamstarvi.

Tá avvarðandi venda sær verða tey kunnað um lógargrundarlagið og hevur hetta í nøkrum førum ført við sær, at avvarðandi hava flutt persónin, t.d. foreldur í fólkayvirlitinum, uttan at viðkomandi veruliga er fluttur. Í hesum førum kemur § 6 í lóg um fólkaskráseting at avgera, um viðkomandi er rætt skrásettur og harvið hevur rætt til at koma á bíðilista í kommununi, heldur enn eldralógin.

Tey avvarðandi grundgeva við, at tey øll búgva í Tórshavnar kommunu og at foreldrini tí ikki fáa ta vitjan, hjálp v.m. tey høvdu fingið um tey búðu tættari at.

Sambært eldralógini skal sjálvsavgerðarrætturin hjá borgaranum virðast og Tórshavnar kommunu metir, at tað er ikki rímiligt, at fólk verða stavnsbundin á einum røktarheimi ella á einum stovni sum tey einaferð hava fingið pláss á uttan møguleika fyri at flyta, tí lógin ikki er regulerað á hesum øki.

18. mai 2017 boðaði aðalstjórin í Almannamálaráðnum Tórshavnar kommunu frá, at landsstýriskvinnan í almannamálum ynskir at loysa málið viðv. flyting frá røktarheimi til røktarheim á aðrari kommunu við at leggja fyri tingið uppskot til broytingar í ll um heimatænastu, eldrarøkt o.a í komandi tingsetu saman við uppskoti til tænastulóg.

14. sept. 2018 sendi Kommunufelagið hoyringsskriv um nýggjan vælferðarpakka, ið inniheldur fleiri lógaruppskot m.a. nýggja tænastulóg og broyting av løgtingslóg um heimatænastu og eldrarøkt v.m. (eldralógini).

Tað sást, at viðkomandi lógin *Uppskot til løgtingslóg um broyting i løgtingslóg um heimatænastu og eldrarøkt v.m (Eldralógin)* ikki viðger spurningin um flyting úr røktarheimi til røktarheim í aðrari kommuni og tí var m.a. hetta brot í hoyringssvarinum sent til Almannamálaráðið:

Harumframt eigur sum heild at vera arbeitt við at regulera økið í mun til borgarar, ið ynskja at flyta frá einum røktarheimi í einum kommunusamstarvi/kommunu ella frá einum stovni undir

Almannaverkinum til røktarheim í øðrum kommunusamstarvi/kommunu, har greiða verður fingið á markamótunum millum sjálvsavgerðarrættin hjá borgaranum í mun til rættin hjá myndugleikanum at skipa tilboð og tænastur eftir givnum umstøðum, so sum landafrøðiligum avbjóðingum, logistikki, rakstrarfyrimunum, effektiviteti o.t.

Kommunufelagið hevur í telduposti 2. jan. 2019 boðað frá, at eingin samanhangandi og skipað eftirmeting av eldraøkinum er reiðiliga farin í gongd, hóast Landsstýrið í tíðindaskrivi 4. des. 2017, fráboðaði at hetta fór at verða sett í gongd í 2018. Sí leinkju til tíðindaskriv. https://www.amr.fo/fo/kunning/tidindi/eldraokid-verdur-nu-eftirmett/

Sum skilst er ætlanin í staðin, at kommunurnar umvegis Kommunufelagið seta fram ynski um broytingar í Eldralógini-

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin og fulltrúin í Heilsu- og umsorganartænastuni mæla til, at Tórshavnar kommuna longu nú sendir beinleiðis áheitan til Almannamálaráðið um at fáa viðurskiftini rundanum flyting til og frá røktarheimi í aðrari kommunu/kommunusamstarvi regulerað við lóg.

**Eldranevndin 14. januar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 23. januar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 31. januar 2019:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri, ongari ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Sjúrður Olsen, Bergun Kass, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Bjørg Dam.

Blankt atkvøddi: Annfinn Brekkstein.

# 10/19 Tórshavnar Golfklubbi: Umsókn um stuðul til byggjan av golfvølli og felagshúsi gl. j. nr. 10/27.1991 (1999-1642)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 20.10.2014 | 201/14 | 14/04756-36 |
| 2 Mentamálanevndin | 05.04.2017 | 81/17 | 14/04756-36 |
| 3 Mentamálanevndin | 13.09.2017 | 221/17 | 14/04756-36 |
| 4 Mentamálanevndin | 04.10.2017 | 233/17 | 14/04756-36 |
| 5 Fíggjarnevndin | 18.10.2017 | 231/17 | 14/04756-36 |
| 6 Fíggjarnevndin | 15.11.2017 | 260/17 | 14/04756-36 |
| 7 Býráðsfundur | 22.11.2017 | 262/17 | 14/04756-36 |
| 8 Mentamálanevndin | 30.01.2019 | 32/19 | 14/04756-36 |
| 9 Fíggjarnevndin | 31.01.2019 | 29/19 | 14/04756-36 |
| 10 Býráðsfundur | 31.01.2019 | 10/19 | 14/04756-36 |

## Málslýsing:

Ætlanin er, at stórur partur av flagnum og undirliggjandi tilfar frá Tórsvølli skal flytast út á golføkið á Glyvursnesi. Tað verður Tórshavnar Golfklubbi, sum ger neyðugu fyrireikingarnar at taka ímóti nógva tilfarinum. Partur av hesum er at leggja dren, at javna økið og leggja onkran arbeiðsveg.

Í hesum sambandi søkir Golfklubburin um at leysgeva part av játtanini à 3,3 mió kr., sum felagið fekk í stuðli í 1999. Søkt verður um 250.000 kr. Sjálvt arbeiðið at leggja flagið verður gjørt vi sjálvbodnum arbeiði.

Útreiðslur í sambandi við flutning frá Tórsvølli verður fíggjað av Tórsvallar-verktætlanini. Í útboðstilfarinum skal lýsast neyvt, hvussu flag og tilfar skal fáast upp og leverast á Glyvursnesi, so at klubburin kann arbeiða hetta víðari.

Nevnda játtan á 3,3 mió er ikki beinleiðis tøk á fíggarætlanini, og rúm er ikki fyri játtanini á kontu 5370 Stuðul til íløgur. Hinvegin er játtan 5 mió kr. sett av á íløguætlanini til golfvøll. Av tí at hetta arbeiðið er at meta sum partur av nýggjum golfvølli, er skilabest, at stuðulin verður játtaður av hesi játtan.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta Tórshavnar Golfklubba 250.000 kr. í stuðli til at gera fyrireikingar úti á Glyvursnesi at leggja flag og tilfar frá Tórsvølli av kontu 5775 Ítróttaranlegg.

**Mentamálanevndin 29. mars 2012:** Sambært nýggjari kostnaðarmeting verður fíggjartørvurin hjá felagnum til fyrireikingararbeiðið á Glyvursnesi 400.000 kr., og nevndin samtykti at mæla býráðnum um fíggjarnevndina at játta Tórshavnar Golfklubba upp til hesa upphædd av kontu 5775 Ítróttaranlegg.

**Fíggjarnevndin 29. mars 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og at játta Tórshavnar Golfklubba upp til 400.000 kr. av konto 5775 Ítróttaranlegg.

**Býráðið 29. mars 2012:** Einmælt samtykt

**Ískoyti:**
Neyðugt er nú av álvara at seta gongd á fyrireikingarnar til golfbreyt á Glyvursnesi, skal breytin verða liðug í góðari tíð undan oyggjaleikum.

Gjørd er arbeiðsætlan, har eisini Tórshavnar Golfklubbi og Ítróttasamband Føroya taka lut í fyrireikandi arbeiðinum. Arbeiðið í hesum fyrsta stiginum fevnir serliga um at fáa avklárað lendisspurningin, um at menna konsept fyri sjálva golfbreytina bæði ítróttaliga, arkitektoniskt, umhvørvisliga (eitt nú burðardygg vatnveiting, flora v.m.), ferðavinnuliga og fíggjarliga, herundir skipan av rakstri, rakstrarætlan og møguleikar fyri eksternari íløgufígging, og um samstarv við útlendskar partar og serfrøði bæði í Skottlandi, Íslandi og Danmark, har fleiri viðkomandi sambond longu eru knýtt.

Annað áleikandi mál er, at ferðslan eftir vegnum frá Hamrinum og til golfvøllin á Glyvursnesi er nógv økt. Vegurin er tó í slíkum standi, at tað gevur teim koyrandi trupulleikar. Gjørd er kostnaðarmeting at fáa lagt avfresað asfalt eftir vegnum, og kemur hetta at kosta um kr. 50-75.000.

Á íløgukontu 5775 ítróttaranlegg eru kr. 4,6 mió tøkar til golfbreyt. Til tess at fáa fyrireikingarnar í gongd verður mett neyðugt við játtan kr. 500.000, harav játtan eisini kann verða brúkt til avfresa asfalt í mesta lagi upp til kr. 75.000.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 500.000 av kontu 5775 ítróttaranlegg til L57016 Golfvøllur ætlað omanfyri nevndu endamálum.

**Mentamálanevndin 10. oktober 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 24. oktober 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 1. november 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Sambært roknskaparkunngerðini, sum fekk gildi fyri Tórshavnar kommunu 1. januar 2010, skulu tilsagnir um stuðul rakstrarførast í tí ári, tær eru latnar, og upphæddin skal innroknast sum ein skylda í ársroknskapinum. Í grannskoðaraprotokollini fyri ársroknskapin hjá kommununi fyri árið 2011 er tann viðmerking, at játtanin í hesum máli kr. 3,3 mió kr. á kontu 5370 Stuðul til íløgur er ikki innroknað í roknskapin, men einans upplýst sum skylda.

Grannskoðaraprotokollin mælir til, at omanfyri nevnda tilsøgn, sum er frá 1999, verður viðgjørd av nýggjum.

Stuðulin var í síni tíð játtaður felagnum til at byggja ein golfvøll ovaliga í Hoyvík. Henda ætlan er ikki longur aktuel. Hinvegin hevur býráðið sett í gongd verkætlan at fyrireika og byggja golfvøll á Glyvursnesi, sí kontu 5775 Ítróttaranlegg L57016 Golfvøllur. Vísandi til, at upprunatilsøgnin 3,3 mió vórðu ætlaðar til golfvøll, verður mælt til, at henda játtanin verður broytt og játtað til aktuellu verkætlanina á Glyvursnesi.

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at broyta tilsøgnina um stuðul kr. 3,3 mió soleiðis, at upphæddin verður játtað til kontu 5775 L57016 Golfvøllur.

**Mentamálanevndin 17. desember 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. januar 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 24. januar 2013:** Einmælt samtykt.

**Býráðið 21. februar 2013:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeiðsbólkur hevur saman við golfvallararkitekti fyrireikað og ment uppskot til konsept fyri golfvølli á Glyvursnesi. Harumframt er gjørt eitt verkætlanaruppskot, herundir designuppskot til golfvøll við 18 holum og driving range v.m. við kostnaðarmeting og tíðarætlan fyri íløguna, umframt rakstrarmeting, sí frágreiðing latin býráðnum í juni 2013.

Frágreiðingin gevur somuleiðis eina innleiðslu í golf sum ítrótt og frítíðarítriv, møguleikarnar á Glyvursnesi eins og tey atlit, sum tikin eru í mun samfelagsliga, fíggjarliga og umhvørvisliga burðardygd.

Verkætlanin er tengd at ætlanini um oyggjaleikir í Føroyum í 2019, sum tíðarætlanin tí byggir á, men alt verkætlanaruppskotið røkkur longri og breiðari enn tað og vísir m.a. á teir ágóðar, sum golfvøllurin kann hava fyri ferðavinnuna.

Víst verður somuleiðis á, hvussu golfvøllurin endurskapar lendið, sum í sjónligan mun er ávirkað av grótbrotinum, og hvussu verkætlanirnar við golfvølli og útbyggingin av Tórshavnar havn kunnu samskipast og fáa gagn av hvør aðrari. Grótbrotið ætlast brúkt til venjingarvøll, viðlíkahaldsbygningar og parkering v.m. Neyðugt verður tí at broyta avgerðina um at brúka grótbrotið til tyrvingarpláss og onnur staðseting av tyrvingarplássi finnast.

Til tess at koma víðari, er neyðugt við prinsippgóðkenning av verkætlanaruppskotinum, herundir at fáa gjørt ráðgevaraavtalu við golfvallar-arkitektin, sum lið í klárgering til útboð og arbeiðstøkur. Samstundis verður arbeitt við at fáa neyðugu loyvini til lendið. Harumframt skal setast bygginevnd.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla til prinsippgóðkenning av konsept- og verkætlanaruppskotinum, at gjørd verður ráðgevaraavtala við golfvallararkitektin, og at sett verður bygginevnd til verkætlanina.

**Mentamálanevndin 13. juni 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og fara í samráðingar við landsmyndugleikarnar um tess lut í verkætlanini.

**Fíggjarnevndin 19. juni 2013:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

Jógvan Arge luttók ikki í viðgerðini av hesum máli.

**Býráðið 26. juni 2013:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Limirnir í staðbundnu nevndini ynskja hetta málið á skrá.

**Kirkjubøar- og velbastaðarnevndin 09. September 2013:** Kunnað varð um málið.

- Kunning.

**Mentamálanevndin 10. september 2013:** Kunnað varð um málið.

**Mentamálanevndin 20. oktober 2014:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Síðst í juni 2013 sendi Tórshavnar kommuna umsókn til Búnaðarstovuna um at leiga uml. 630.000 fermetra stórt lendi á Glyvursnesi til golfvøll, hetta samsvarandi heimild í lógini um landsjørð § 7a.

Liðin eru skjótt fýra ár, har samráðingar hava verið millum Tórshavnar kommunu og Fiskimálaráðið øðrumegin og festararnar hinumegin. Upprunaavtalan var, at landið skuldi bera endurgjaldskostnaðin, meðan kommunan bar útreiðslurnar at byggja vøllin.
Enn hevur ikki borið til at finna semju um endurgjaldið til tann festaran, sum skal flyta virksemið av økinum og longur suður. Eftir áheitan tilnevndi sorinskrivarin uttanveltaðan metingarmann, men semja fekst heldur ikki um sýns- og metingarskránna, ið er sjálv grundarlagið fyri metingini hjá metingarmanninum.

Ongar veruligar samráðingar hava verið síðani í fjør vár. Í samgonguskjalinum hjá býráðsmeirilutanum er skrivað, at saman við Tórshavnar Golffelag verður farið undir at gera eina heildarætlan fyri golfvølli á Glyvursnesi. Í hesum sambandi verður málið nú tikið uppaftur.

Sum framgongur av málinum omanfyri, fyriliggur eitt verkætlanaruppskot um golfvøll við 18 holum, umframt driving range, ið er staðsett í fyrra grótbrotinum. Uppskotið stóð Edwin Roald, viðurkendur íslendskur golfvallararkitektur, fyri í samstarvi við kommununa og Golffelagið. Sí hjáløgdu verkætlanarlýsing.

Vøllurin skuldi tá byggjast í einum yvir eitt stutt áramál, tí hann skuldi verða liðugur til Oyggjaleikir 2019. Hetta er ikki longur aktuelt, og tí ber til sum liður í heildarætlan at skipa tilgongdina at byggja golfvøllin øðrvísi og yvir longri tíð.

Hetta er tilgongd, ið Golffelagið sjálvt vísir á sum gongda leið eitt nú soleiðis, at 1-2 hol (breytir) verða bygd hvørt árið, og har ávís upphædd samsvarandi verður sett á íløguætlanina.

Til tess at koma víðari, verður mett neyðugt, at samráðingarnar um leigu av lendinum og endurgjald tí viðvíkjandi verða tiknar uppaftur soleiðis, at málið verður loyst skjótast. Harumframt at heita á golfvallararkitektin um at gera eitt tillagað uppskot til heildarætlan og verkætlanartilgongd, har bygt verður yvir longri tíð, og at settur verður verkætlanarbólkur við umboðum fyri kommununa og golffelagið.

Eingin játtan er tøk til golfvøll á íløguætlanini, men mett verður, at hetta fyrsta fyrireikandi tíðarskeiðið kann haldast innan verandi rakstrarkarmar, og at íløgujáttan verður at koma á fíggjarætlanini frá 2018.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka uppaftur samráðingarnar um leigu av lendinum til golfvøll. Harumframt verður mælt til at heita á golfvallararkitektin, sum í 2013 gjørdi uppskotið til golfvøll, um at gera eitt tillagað uppskot til heildarætlan og verkætlanartilgongd, har bygt verður yvir longri tíð, og at settur verður verkætlanarbólkur við fimm umboðum, har fyrisitingingarnar hava hvør sítt og Tórshavnar Golffelagið hevur tvey.

**Mentamálanevndin 05. apríl 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Uppskot til heildarætlan og yvirskipaða verkætlartilgongd verður lagt fram.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at umrøða uppskotið.

**Mentamálanevndin 13. september 2017:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Víst verður til uppskotið til tillagað verkætlan um bygging av golfvølli, ið løgd varð fram í mentamálanevndini 13. september 2017.

<u>Golfvøllur við 9 holum fyrst</u>
Sbrt. uppskotinum verður hildið fast við heildarætlan um golfvøll við 18 breytum/holum á Glyvursnesi, men har mælt verður til bygging í stigum, har fyrsta stigið er at byggja níggju hol árini 2018-2022, og at tað eftir hetta verður tikin støða til, hvørt farast skal víðari at byggja vøllin út til 18 hol beinanvegin ella seinni.

Fyri at skipa byggiarbeiðið best er tilmælið, at trý hol verða bygd um árið uttan íhald soleiðis, at tað í 2022 eru 9 hol tøk. Hetta hevur eisini tann ítróttaliga fyrimun, at til ber at spæla golf samstundis, har tey fyrstu trý holini væntandi eru klár í 2020, seks hol í 2021 og níggju hol í 2022.

Verkætlanarbólkurin, sum eru fyrisitingarstjórarnir og tvey umboð fyri golffelagið, tekur undir við hesi tilgongd. Henda bygging kann í stórum øll fremjast í tí syðra økinum av Glyvursnesi,

sum sambært byggisamtyktini longu er lagt út sum D2 økið, tvs. ítróttarøki. Hetta økið er uml. 270.000 m2.

Kommunan sendi í 2013 samsvarandi áseting í grein 7a í lóg um landsjørð umsókn til Búnaðarstovuna um at leiga uml. 630.000 m2 stórt lendi á Glyvursnesi til golfvøll við 18 holum. Við broyttu tilgongdini, har byrjað verður at byggja 9 hol, ber til at tillaga umsóknina um leigu soleiðis, at økið bert fevnir um teir uml. 270.000 m2.

Integrera golfvøll við tyrving og havnarútbygging
Sum liður í heildarætlanini fyri golfvølli við 18 holum, verða í frágreiðingini eisini umrøddir møguleikar at integrera golfvallarútbyggingina bæði við tyrvingarætlanina og við arbeiðið hjá Tórshavnar havn í nýggja grótbrotinum, har mett verður, at til ber at skapa felags ágóðar bæði fíggjarliga, umhvørvisliga og samfelagsliga.

Fyri golfvøllin ítøkiliga vil tað eitt nú merkja, at til ber at byggja suðureftir, har lendið er ikki so avbjóðandi sum á norðara partinum, og inn í umskapaðu grótbrotini og harvið spara lendi. Í frágreiðingini verður víst á dømi úti í heimi tí viðvíkjandi, og mælt verður til, at ymsu kommunalu áhugapartarnir og polilitiska skipanin viðgera perspektivini í hesum.

Verkætlanarbólkurin tekur sum heild undir við hesi tilgongd, men ásannandi, at talan er um viðurskifti, sum kunnu taka langa tíð, verður mælt til, at politiska skipanin setir út í kortið heildarætlan fyri Glyvursnes, harundir, hvat gerast skal við grótbrotini og møguliga integratión við golfvøllin.

Smart Range
Eisini sum liður í at spara lendi í fyrsta byggistigi, verður í frágreiðingini skotið upp at fáa til vega sonevnt Smart Range, sum er innandura golfsimulator. Smart Range er tilgild loysn, sum í ávísan mun kann koma í staðin fyri ella supplera ein vanligan driving range, sum er stórur og lendiskrevjandi venjingarvøllur.

Fyrimunur við Smart Range er harumframt, at tað nýskapandi háttur at introdusera golfspælið bæði til børn, vaksin og eldri, at skapa forvitni og draga nýggjar íðkaðar til føroyska golfumhvørvið. Ein Smart Range kann setast upp í hølum so at siga hvar sum helst.

Verkætlanarbólkurin tekur undir við at fáa til vega Smart Range í øllum førum sum partur av fyrsta byggistigið.

Tíðarætlan og kostnaðarætlan
Uppskotið er, at verkætlanin í 2018 verður nærri prosjekterað og designað, at byrjað verður at byggja trý tey fyrstu holini, og at Smart Range verður sett upp í býnum. Í 2019 verða hesi holini gjørd liðug og byrjað verður uppá trý tey næstu. Og so heldur arbeiðið fram soleiðis, at øll tey níggju holini eru liðug og klára at spæla á í 2022.

Samlaði kostnaðurin er mettur til uml. kr. 27 mió, har metti tørvurin fyri 2018 er kr. 4 mió. Harumframt skulu gerast gøtur og amboðsbygningur.

Verkætlanarbólkurin tekur undir við tíðarætlanaruppskotinum, sum tó má taka støði í teirri fígging, ið játtað verður til golfvøllin hesi árini. Í løtuni er eingin fígging sett av til endamálið burtursæð frá teimum kr. 300.000, ið settar eru av til fyrireikingar í inniverandi fíggjarári.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at:

- uppruna golfvallarætlanin verður tillagað soleiðis, at bygdur verður golfvøllur við 9 holum, men tó so, at tað skal bera til at byggja vøllin út til 18 hol seinni
- senda Búnaðarstovuni nýggja umsókn um leigu av lendi svarandi til syðra D2-økið á Glyvursnesi, í alt uml. 270.000 m2, ætlað til golfvøll við 9 holum
- fáa til vega nærri politiska støðutakan til møguleikan at integrera næsta byggistig til 18 hol við grótbrotini og samskipast við aðrar kommunalar verkætlanir har til tess at skapa felags ágóðar sum liður í heildarætlan fyri Glyvursnes
- fyrireika útvegan av Smart Range, og at
- ætlan fyri fígging verður løgd í sambandi við langtíðaríløguætlanina.

**Mentamálanevndin 04. oktober 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Heðin Mortensen var ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2017:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 15. november 2017:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 22. november 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Tekstur kemur seinni.

**Mentamálanevndin 30. januar 2019:** Kunnað varð um málið.

**Fíggjarnevndin 31. januar 2019:** Útsett.

**Býráðsfundur 31. januar 2019:** Tikið av skrá.

# 11/19 Játtan í 2019 til smærri ítróttaanlegg v.m.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 16.01.2019 | 25/19 | 19/00144-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 23.01.2019 | 14/19 | 19/00144-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 31.01.2019 | 26/19 | 19/00144-1 |
| 4 Býráðsfundur | 31.01.2019 | 11/19 | 19/00144-1 |
| 5 Mentamálanevndin | 13.02.2019 | 50/19 | 19/00144-1 |

**Upprunin til málið:**
Játtan 5775 í fíggjarætlanini fyri 2019

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Flyta tøka løgujáttan til verkætlanarkontur.

Í fíggjarætlanini fyri 2019 er samtykt løgukonta 5775 ítróttaanlegg við eini játtan á 7.400 tkr. harav 4.400 tkr. til langhyl og 3.000 tkr. til ymiskar ítróttaverkætlanir, herundir fyrireikingar v.m.

Í verandi støðu er talan um hesar verkætlanir og mettar upphæddir:

Gøtuítrótt – 150 tkr. (málnr. 18/01746)
Klintring og skateing í Bacalao – 1.500 tkr. (málnr. 16/03313 og 16/04764)
Venjingarhøli í Kollafirði – 300 tkr.
Golf og annað – 1.050 tkr.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at flyta 3.000 tkr av løgukarminum 5775 á løgukontu L57029. Smærri ítróttaanlegg. Harumframt verður mælt til at taka undir við raðfestingini av verkæktlanum sum lýst í málslýsingini.

**Mentamálanevndin 16. januar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 23. januar 2019:** Málið útsett.

**Fíggjarnevndin 31. januar 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Helena Dam á Neystabø og Tróndur Sigurðsson, atkvøða blankt.

**Býráðsfundur 31. januar 2019:** Samtykt við níggju atkvøðum fyri, ongari ímóti og fýra blonkum atkvøðum at taka undir við meirilutanum í fíggjarnevndini.

Fyri atkvøddu Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Sjúrður Olsen, Bergun Kass, Halla Samuelsen og Bjørg Dam.

Blankt atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø og Annfinn Brekkstein.

# 12/19 Ólavur S. T. Thorsteinsson : Umsókn vegna Skatefelagið um stuðul til eina innandura skatepark

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 04.10.2017 | 249/17 | 16/04764-5 |
| 2 Mentamálanevndin | 08.11.2017 | 273/17 | 16/04764-5 |
| 3 Mentamálanevndin | 29.11.2017 | 315/17 | 16/04764-5 |
| 4 Mentamálanevndin | 06.02.2018 | 60/18 | 16/04764-5 |
| 5 Mentamálanevndin | 07.03.2018 | 112/18 | 16/04764-5 |
| 6 Mentamálanevndin | 11.04.2018 | 119/18 | 16/04764-5 |
| 7 Mentamálanevndin | 12.09.2018 | 267/18 | 16/04764-5 |
| 8 Mentamálanevndin | 08.10.2018 | 309/18 | 16/04764-5 |
| 9 Vinnunevndin | 01.10.2018 | 39/18 | 16/04764-5 |
| 10 Mentamálanevndin | 07.11.2018 | 327/18 | 16/04764-5 |
| 11 Mentamálanevndin | 16.01.2019 | 23/19 | 16/04764-5 |
| 12 Fíggjarnevndin | 23.01.2019 | 15/19 | 16/04764-5 |
| 13 Fíggjarnevndin | 31.01.2019 | 27/19 | 16/04764-5 |
| 14 Býráðsfundur | 31.01.2019 | 12/19 | 16/04764-5 |

**Málslýsing:**
Kommunan hevur fingið umsókn um frá Skatefelagnum um stuðul til eina innandura skatepark. Í verandi støðu hevur kommunan eitt uttandura skateanlegg sunnanfyri grasfløtuna á Frælsinum. Hetta er í hampiligum standi. Sí hjálagda mynd.

Kommunan hevur eisini í 2016 fingið áheitan (mál 16/03692) frá nøkrum dreingum um at fáa ein innandura skateboardbana.

Skatefelagið hevur gjørt eitt uppskot til møguligar loysnir. Sí hjálagt. Felagið hugsar at hetta eitt nú kundi verið gjørt í onkrum verandi bygningi, ið er egnaður til endamálið. Eisini hevur verið umrøtt at slíkt anlegg kundi verið undir eini uttandura takloysn har sum økið so eisini kundi verið brúkt til onnur endamál. Sí dømi hjálagt.

Á fundinum fer umsitingin við støði í uppskotinum at greiða frá møguligum hugsandi staðsetingum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða uppskotið og síðani at beina málið til ummælis í byggi- og býarskipanarnevndini við atliti til møguligar staðsetingar og hvørt ein staðseting í býarrúminum er áhugaverd.

**Mentamálanevndin 04. oktober 2017:** Samtykt at arbeiða víðari við málinum.

Heðin Mortensen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti 8. november 2017**
Umsitingin hevur verið í innleiðandi samskifti við Tórshavnar havn um møguleikar fyri skate-virksemi í Bacalao. Umsitingin kemur á fundinum á vísa fram tekningar og møguligar hugsandi loysnir. Mest upplagt er at kombinera hetta virksemi við annað frítíðarvirksemi.

Hartil kemur spurningurin um fígging av leigukostnaði.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at heimila umsitingini at fara víðari víðari við samskiftinum við Skatefelagið um loysn í Bacalao og venda aftur til nevndina við einum úrsliti.

**Mentamálanevndin 08. november 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Skatefelagið er í holt við at gera uppskot til skateanlegg í hølunum. Til fundin kemur eitt skitsuuppskot.

Samstundis er samskifti við Klintrifelagið og Veiði- og skjótifelagið. Til fundin í januar er væntandi at ein samlað disponering av virkseminum fyriliggur.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða uppskotið.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Umrøtt og samtykt at umsitingin arbeiðir víðari við ætlanini.

**Ískoyti**
Sí ískoyti og tilmæli í máli 16/03313.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Umrøtt og samtykt at umsitingin arbeiðir víðari við ætlanini.

**Ískoyti**
Sí ískoyti og tilmæli í máli 16/03313.

**Mentamálanevndin 06. februar 2018:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Turið Horn, Marin Katrina Frýdal og Halla Samuelsen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Heðin Mortensen, tekur støðu á seinni fundi.

**Ískoyti:**
Umsitingin saman við Tórshavnar havn er saman við ráðgeva í holt við samskifti við byggivaldið um loyvi til at brúka hølini í Bacalao og avklára tilhoyrandi projektviðurskifti. Sí hjálagt skitsu v.m.

Ætlandi fyriliggur avkláring við byggivaldið í næstum, saman við kostnaðarmeting, tíðarætlan v.m.

Umsitingin kunnar um málið á fundinum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka kunningina til eftirtektar.

**Mentamálanevndin 07. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Fingin er nú til vega tekning, byggiloyvi og kostnaðarmeting fyri gerð av verkætlan til skating og klintring í Bacalao (sí hjáløgd skjøl).
Harumframt hevur Tórshavnar havn gjørt kostnaðarmeting fyri ymiskt í sambandi við elskipanina.

Sbrt. metingum hjá ráðgeva eru hondverkaraútreiðslurnar fyri verkætlanina mettar til 1.115 t. Tórshavnar havn hevur fingið mett el-arbeiðið til 219 tkr. Hartil skal leggjast afturat 10-15% til ókent, 6,25% til kommunalt MVG, umframt eini 6% til ráðgeving í sambandi við útbjóðing og eftirlit.

Støða er ikki tikin til møguligt býtið millum Tórshavnar havn og Tórshavnar kommunu. Hetta krevur eina nærri samráðing í sambandi við møguliga leigumálið.

Hartil kemur møguligur stuðul til skateanleggið og klintrianleggið inni í høllini.
Tilfarskostnaðurin fyri klintrianleggið er mett til 418 tkr. og skateanleggið mett til 250 tkr.

Tá er roknað við, at feløgini standa fyri tí mesta av handverkaraarbeiðinum. Harumframt er tá ikki tikin hædd fyri hvussu nógva fígging feløgini sjálvi kunnu fáa til vega.

Á fundinum kemur umsitingin at gjøgnumganga tilfarið í málinum. Játtan er ikki tøk til verkætlanina.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til, um arbeiðast skal víðari við verkætlanini.

**Mentamálanevndin 11. apríl 2018:** Samtykt at arbeiðast skal víðari við verkætlanini.

**Ískoyti**
Feløgini hava nú latið TK dagførd uppskot til fíggjarætlan fyri bygging av sjálvum anleggunum til ávikavist skateing og klintring í Bacalao. Teirra fíggjartørvur, tá íroknað nógv sjálvboðið arbeiðið er á.v.v.:

Skateanleggið: 258 tkr. íroknað MVG.
Klintrianleggið: 340 tkr. íroknað MVG.

Hartil kemur klárgerð av høllini sbrt. áður gjørdu meting t.e. umleið 1408 tkr. til umbyggingar og umvælingar av høllini og uttanfyri høllina (íroknað ókent, ráðgeving&eftirlit og kommunalt MVG).

Tórshavnar havn kemur ætlandi at gera el-arbiðið fyri egna rokning mett til umleið 200 tkr. Ætlanin er nú at fara í eina endaliga tilgongd við Tórshavnar havn at avklára markamót og um Tórshavnar havn skal standa fyri umvælingini av høllini.

Rakstur
Í næstum er ætlanin at gera endaliga rakstarætlan og avtalu fyri anleggið, herundir leigugjaldið til Tórshavnar havn. Mett verður hóskandi, at feløgini fáa ávíst endurgjald fyri hallarleigu. Kann samanberast við skipanina fyri ókeypis hallarleigu, ið er galdandi part av árinum.

Samanumtikið er ein fíggjartørvur á umleið 2.000 tkr fyri samlaðu verkætlanina. Arbeiðið at gera høllina klára kann ætlandi fara í gongd í endanum av árinum ella fyrst í komandi ári.

Skotið verður upp at fíggja verkætlanina av kontuni til smærri ítróttaanlegg (sí mál 18/03320 Játtan til smærri ítróttaanlegg v.m.). Har eru væntandi umleið ¼ av fíggingini til hesa verkætlan tøkar í 2018 og má so restin raðfestast í fíggjarætlanini fyri 2019, antin kontan til smærri ítróttaanlegeg ella kontu 5370 Stuðul til íløgur.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:

a). at umsitingin fer undir at gera endaliga samstarvs- og rakstraravtalu við Skatefelagið og Klintrifelagið um menning og samstarv um klintri- og skatehøll í Bacalao.
b). At umsitingin fer undir at gera endaliga avtalu við Tórshavnar havn um umbygging og umvæling av ætlaðu hølini í Bacalao til frítíðarendamál og venda aftur í nevnd til endaliga viðgerð av málinum.

**Mentamálanevndin 12. september 2018**: Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Uppskot er gjørt til leiguavtalu millum Tórshavnar havn og kommununa um 400 m$^2$ á 2. Hædd í Bacalao bygninginum.
Leiguupphæddin er 120 tkr um árið. Tórshavnar havn ger tillagingar í elveitingini fyri góðar 200 tkr, sum verður fíggjað av rakstri.

**Tilmæli frá havnameistaranum:** Mælt verður til at taka undir við uppskoti til leigusáttmála j.nr 16/04764-24.

**Vinnunevndin 01. oktober 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í mentamálanevndina.

**Ískoyti**
Tórshavnar havn ynskir at TK stendur fyri leigusáttmálanum við Tórshavnar havn og at TK síðani letur Skatefelagnum og Klintrifelagnum rætt til at innrætta hølini við sínum anleggum og rætti til at brúka hølini. Hugsanin er at Ítróttanlegg formliga kemur at standa fyri viðurskiftunum við feløgini. Til komandi fund verða klárir endaligar samstarvsavtalur um brúksrætt og um stuðul til gerð av anleggunum hjá feløgunum, umframt taka støðu til møguligan stuðul til hallarleigu. Næsta stig er at fáa fyrireika miðhøllina so at hon kann vera

klár til virksemi hjá feløgnum sbrt. byggiloyvinum. Arkitektavirkið Ove Mortensen kemur at standa fyri fyrireiking av verkætlanini, at heinta inn tilboð, umframt hava eftirlit við arbeiðinum. Tá tað endaliga tilboðið fyriliggur ber til at gera endaliga kostnaðarætlan. Tá ber til at siga nærri um, hvat er neyðugt av fígging til samlaðu verkætlanina.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja at heimila umsitingini at heinta inn tilboð uppá klárgerð av miðhøllini á aðru hædd á Bacalao og at venda aftur í nevnd við endaligari kostnaðarætlan.

**Mentamálanevndin 08. oktober 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**:
Tekstur kemur til fundin.

**Mentamálanevndin 07. november 2018:** Útsett.

**Ískoyti:**
Ráðgevin hevur nú fingið innheintað tilboð uppá klárgerð av høllini o.a. Hondverkaraútreiðslurnar eru mettar til 1.125.980 kr, umframt ráðgeving, ókent og kommunalt MVG samanlagt 1.412 tkr. Á løgukontu L57029 Smærri ítróttaanlegg v.m. eru 520 tkr. tøkar til verkætlanina og restin verður at fíggjað av kontuni 5575 Smærri ítróttaanlegg í 2019. Sí mál 19/00144 Játtan í 2019 til smærri ítróttaranlegg v.m.

Til komandi fund verður tøk endalig samstarvsavtala við Skatefelagið um uppbygging, menning og rakstur av skateanleggi í Bacalao og samstarvsavtala við Klintrifelag Føroya um uppbygging, menning og rakstur av klintrianleggi í Bacalao.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at innganga avtalu við Timburmeistara Rúni Brandur Dam um gerð av arbeiðinum. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 16. januar 2019:** Samtykt at innganga arbeiðstøkusáttmála við Rúna Brandur Dam og játta 1.412 tkr. av íløgukontu 5775 L57029 smærri ítróttaanlegg og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Marin Katrina Frýdal var ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Fíggjarnevndin 23. januar 2019:** Málið útsett.

**Ískoyti:**
Víst verður til ískoytið omanfyri, ið her verður nærri útgreinað.

Viðv. arbeiðstakarasáttmálanum

Arbeiðstakarasáttmálin (sí hjálagt skjal íroknað nøgdarlista og tekning) við Timburmeistara Rúna Brandur Dam (er nú umskipað frá ÍVF til Sp/f North built) er áljóðandi 773.500 kr, meðan positiónirnar 11, 13 og 14 í nøgdarlistanum eru rokningararbeiði, mett av ráðgevanum til umleið 350 tkr. Hetta vegna ávísar óvissur viðv. brunaklæðingararbeiði í høgari hædd.

Samlaður kostnaður at gera hølini klár íroknað ókent, mvg og ráðgeving er 1.412 tkr.

Í uppskoti er at fíggja arbeiðið av kontu 5775 smærri ítróttaranlegg, sí mál 19/00144 av játtanini fyri 2019.

Arbeiðið fevnir um eina røð av átøkum fyri at liva upp til galdandi krøv til brunatrygd í høllini og í gongini uttanfyri høllina, og sum eru trygdir fyri byggiloyvinum. Høllin verður ein høll uttan serliga upphiting og kann sambært byggiloyvinum heldur ikki upphitast.

Viðv. stuðli til anleggini
Til komandi fund í mentamálanevndini koma endaligu avtalurnar við Kintrifelagið og Skatefelagið til viðgerðar í mentamálanevndini, herundir stuðul til feløgini at byggja upp teirra anlegg, sum er klintriveggur og skatebreyt/-rampur. um mett til á.v.v. 340 tkr. og 258 tkr., t.e. 598 kr.
Hesin parturin verður fíggjaður at av kontu 5775 L57029 smærri ítróttaranlegg fyri 2018, sí mál 18/03320.
Samlaður fíggjartørvur til at gera hølini klár og at seta upp klintri- og skateanlegg er sostatt 2.010 tkr.

Stuðul til raksur
Vinnunevndin samtykti 1. oktober 2019, at leigusáttmálin við Tórshavnar havn um hølini skal ganga umvegis Tk/Ítróttaanlegg, og at kommunan so ger leiguavtalu við feløgini.
Leigan er 120 tkr. um árið. Feløgini hava latið inn uppskot til rakstarætlan, har søkt er um stuðul til hallarleigu.
Mett er hóskandi, at feløgini fáa ávíst endurgjald líknandi leistinum fyri ókeypis hallarleigu (sí samtykt 12. september 2018 í mentamálanevndini). Eftir teirri skipanini er ókeypis hallarleiga umleið átta og ein hálvan mánað av árinum. Sostatt skuldu feløgini fingið stuðul til umleið 2/3 av kostnaðinum t.e. 5.000 tkr./mán. í leigu hvørt felagið, og so 3.300 kr./mán. í stuðli hvør. Hetta verður ætlandi mælt til at játta av kontu 5365 stuðul til ítrótt. Hædd má takast fyri hesum økta fíggjartørvi á nevndu kontu.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin vísa til tilmælið til fund í mentamálanevndini 16. januar 2019 og fígging í málinum 19/00144.

**Fíggjarnevndin 31. januar 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 31. januar 2019:** Tikið av skrá.

## 13/19 Klintrifelag Føroya

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 13.09.2017 | 222/17 | 16/03313-8 |
| 2 Mentamálanevndin | 04.10.2017 | 238/17 | 16/03313-8 |
| 3 Mentamálanevndin | 08.11.2017 | 271/17 | 16/03313-8 |
| 4 Mentamálanevndin | 29.11.2017 | 312/17 | 16/03313-8 |
| 5 Mentamálanevndin | 06.02.2018 | 59/18 | 16/03313-8 |
| 6 Mentamálanevndin | 11.04.2018 | 118/18 | 16/03313-8 |
| 7 Mentamálanevndin | 12.09.2018 | 266/18 | 16/03313-8 |
| 8 Mentamálanevndin | 08.10.2018 | 308/18 | 16/03313-8 |
| 9 Mentamálanevndin | 07.11.2018 | 328/18 | 16/03313-8 |
| 10 Mentamálanevndin | 16.01.2019 | 24/19 | 16/03313-8 |
| 11 Fíggjarnevndin | 23.01.2019 | 16/19 | 16/03313-8 |
| 12 Fíggjarnevndin | 31.01.2019 | 28/19 | 16/03313-8 |
| 13 Býráðsfundur | 31.01.2019 | 13/19 | 16/03313-8 |

**Málslýsing:**
Klintrifelag Føroya er frítíðarfelag hjá klintrarum í Føroyum. Felagið hevur ein klintrivegg (hávegg) í Norðradali. Harumframt er ein innandura klintriháveggur á x metrar í Skúlanum við Løgmannabreyt, ið felagið eisini brúkar. Felagið hevur eisini verið aktivt innan at menna klintring í bjørgum v.m. kring oyggjarnar. Veitarar innan ferðavinnu veita eisini í ávísan mun tilboð innan klintring við línu t.d. á Skanasanum og við ferjuleguna á Gomlurætt, har eisini frítíðarklintrarar ofta eru.

Klintring er ein ítrótt, sum tekur seg alsamt meiri fram í grannalondunum innan at kalla allar aldursbólkar og kyn. Innan økið eru mentar mannagongdir og trygdarfyriskipanir, ið gera at talan er um eitt lutfalsliga trygt frítíðarítriv.

Felagið ynskir fegin at samstarva við Tórshavnar kommunu um at menna betri innandura klintrimøguleikar. Her verður skilt í millum sonevndar buldriveggir, ið eru upp til 4 metrar, har klintrað verður uttan línu og har mátta liggur undir sum stoytverja. Umframt sonevndar háveggir, ið t.d. ganga upp til 12-14 metrar og har trygdarlína verður brúkt.

Felagið er komið við ymiskum uppskotum til møgulig støð har ein klintridepil kundi verið gjørdur. Felagið leggur áherðslu á at tey sjálvi vilja vera ein aktivur partur í at menna anleggini bæði við arbeiðsmegi, serkunnleika v.m.

Á fundinum fer umsitingin at greiða frá nøkrum av uppskotunum hjá felagnum. Harumframt ynskir felagið fegin at fáa onnur uppskot frá kommununi.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða málið við atliti at umsitingin fyrireikar málið víðari og kemur við einum tilmæli til fund í nevndini í heyst.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Umrøtt og samtykt at umsitingin arbeiðir víðari við ætlanini.

**Ískoyti**
Sí ískoyti og tilmæli í máli 16/03313.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Umrøtt og samtykt at umsitingin arbeiðir víðari við ætlanini.

**Ískoyti**
Sí ískoyti og tilmæli í máli 16/03313.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Umrøtt og samtykt at umsitingin arbeiðir víðari við ætlanini.

**Ískoyti**
Sí ískoyti og tilmæli í máli 16/03313.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Umrøtt og samtykt at umsitingin arbeiðir víðari við ætlanini.

**Ískoyti**
Sí ískoyti og tilmæli í máli 16/03313.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Umrøtt og samtykt at umsitingin arbeiðir víðari við ætlanini.

**Ískoyti**
Sí ískoyti og tilmæli í máli 16/03313.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Umrøtt og samtykt at umsitingin arbeiðir víðari við ætlanini.

**Ískoyti**
Sí ískoyti og tilmæli í máli 16/03313.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Umrøtt og samtykt at umsitingin arbeiðir víðari við ætlanini.

**Ískoyti**
Sí ískoyti og tilmæli í máli 16/03313.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Umrøtt og samtykt at umsitingin arbeiðir víðari við ætlanini.

**Ískoyti**
Sí ískoyti og tilmæli í máli 16/03313.

**Mentamálanevndin 13. september 2017:** Útsett.

**Mentamálanevndin 04. oktober 2017:** Umrøtt.

Heðin Mortensen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti 8. november 2017**:
Umsitingin hevur verið í innleiðandi samskifti við Tórshavnar havn um møguleikar fyri hesum virksemi í Bacalao. Umsitingin kemur á fundinum á vísa fram tekningar og møguligar hugsandi loysnir. Mest upplagt er at kombinera hetta virksemi við annað frítíðarvirksemi.

Hartil kemur spurningurin um fígging av leigukostnaði.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at heimila umsitingini at fara víðari við samskiftinum við Klintrifelagið um loysn í Bacalao og venda aftur til nevndina við einum úrsliti.

**Mentamálanevndin 08. november 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Felagið hevur gjørt skitsuuppskot til anleggið. Á fundinum verður greitt nærri frá hjálagda uppskotið og fyribils metingum kostnað.

Samstundis er samskifti í gongd við Skatefelagið og Veiði- og skjótifelagið. Til fundin í januar er væntandi at ein samlað disponering av virkseminum fyriliggur.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða uppskotið.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Umrøtt og samtykt at umsitingin arbeiðir víðari við ætlanini.

**Ískoyti**
Í januar hevur umsitingn verið á ástaðarfundi í Bacalao saman við umboðum fyri Tórshavnar havn og Byggi- og umhvørvisdeildina. Talan var um ein innleiðandi dialog fyri at fáa yvirskipaða fatan av teimum treytum og krøvum, ið eru hugsandi í sambandi við møguligt frítíðarvirksemi í bygningunum og tí ikki í hesum umfari at rokna sum myndugleikaviðgerð ella líknandi. Ítøkiliga ætlanin er í bygninginum á Vestara bryggju 13.

Um frítíðarvirksemi sum t.d. klintring og skateing skal ein fyrireikandi greining gerast soleiðis at ein formlig umsókn kann sendast til byggivaldið. Stóra avbjóðingin í slíkari viðgerð er, í

hvønn mun ásetingar í kunngerð nr. 72 frá 27. Juni 2017 um bygningskunngerð 2017 gera seg galdandi. Her kann serliga nevnast møgulig krøv í mun til brunatrygd, bjálving, atkomu, el-skipanir o.a.m. Samstundis er avgerandi, í hvønn mun tað ber til at fáa góðkenning til møgulig frávik, í mun til bygningskunngerðina.

Mett verður hóskandi at fáa ráðgeva at fyrireika uppskot til umsókn til byggivaldið um loysn í nevndu hølum til frítíðarvirksemi innan klintring, skateing og evt. annað. Tá vil dentur verða lagdur á at gera eina loysn, ið er so einføld sum tilber, og sostatt ikki er til óneyðug órógv fyri møguligar framtíðarætlanir hjá Tórshavnar havn fyri bygninginum. Alt hetta verður gjørd í samstarvi og við góðkenning frá Tórshavnar havn sum eigara og rakstrarharra í bygninginum. Mettur kostnaður er 35 tkr.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at heimila umsitingini til at fáa ráðgeva at fyrireika loysn og umsókn til byggivaldið saman við Tórshavnar havn til byggivaldið og í fyrsta umfari fíggjað nevnda ráðgevarakostnaðin av konto 5366 stuðul til ítrótt.

**Mentamálanevndin 06. februar 2018:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Turið Horn, Marin Katrina Frýdal og Halla Samuelsen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Heðin Mortensen, tekur støðu á seinni fundi.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Umrøtt og samtykt at umsitingin arbeiðir víðari við ætlanini.

**Ískoyti**
Sí ískoyti og tilmæli í máli 16/03313.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Umrøtt og samtykt at umsitingin arbeiðir víðari við ætlanini.

**Ískoyti**
Sí ískoyti og tilmæli í máli 16/03313.

**Ískoyti**
Sí ískoyti og tilmæli í máli 16/04764.

**Mentamálanevndin 11. apríl 2018:** Samtykt at arbeiðast skal víðari við verkætlanini.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Umrøtt og samtykt at umsitingin arbeiðir víðari við ætlanini.

**Ískoyti**
Sí ískoyti og tilmæli í máli 16/03313.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Umrøtt og samtykt at umsitingin arbeiðir víðari við ætlanini.

**Ískoyti**
Sí ískoyti og tilmæli í máli 16/04764.

**Mentamálanevndin 12. september 2018:** Víst verður til samtykt í máli 16/04764.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Umrøtt og samtykt at umsitingin arbeiðir víðari við ætlanini.

**Ískoyti**
Sí ískoyti og tilmæli í máli 16/03313.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Umrøtt og samtykt at umsitingin arbeiðir víðari við ætlanini.

**Ískoyti**
Tórshavnar havn ynskir at TK stendur fyri leigusáttmálanum við Tórshavnar havn og at TK síðani letur Skatefelagnum og Klintrifelagnum rætt til at innrætta hølini við sínum anleggum og rætti til at brúka hølini. Hugsanin er at Ítróttanlegg formliga kemur at standa fyri viðurskiftunum við feløgini. Til komandi fund verða klárir endaligar samstarvsavtalur um brúksrætt og um stuðul til gerð av anleggunum hjá feløgunum, umframt taka støðu til møguligan stuðul til hallarleigu. Næsta stig er at fáa fyrireika miðhøllina so at hon kann vera klár til virksemi hjá feløgnum sbrt. byggiloyvinum. Arkitektavirkið Ove Mortensen kemur at standa fyri fyrireiking av verkætlanini, at heinta inn tilboð, umframt hava eftirlit við arbeiðinum. Tá tað endaliga tilboðið fyriliggur ber til at gera endaliga kostnaðarætlan. Tá ber til at siga nærri um, hvat er neyðugt av fígging til samlaðu verkætlanina.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja at heimila umsitingini at heinta inn tilboð uppá klárgerð av miðhøllini á aðru hædd á Bacalao og at venda aftur í nevnd við endaligari kostnaðarætlan.

**Mentamálanevndin 08. oktober 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum. Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Umrøtt og samtykt at umsitingin arbeiðir víðari við ætlanini.

**Ískoyti**
Sí ískoyti og tilmæli í máli 16/03313.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Umrøtt og samtykt at umsitingin arbeiðir víðari við ætlanini.

**Ískoyti**
Sí ískoyti og tilmæli í máli 16/04764.

**Mentamálanevndin 07. november 2018:** Útsett.

**Ískoyti**:
Sí ískoyti og tilmæli í máli 16/04764 Ólavur S. T. Thorsteinsson: Umsókn vegna Skatefelagið um stuðul til eina innandura .

**Mentamálanevndin 16. januar 2019:** Víst verður til samtyktina í máli 16/04764.

**Fíggjarnevndin 23. januar 2019:** Málið útsett.

**Fíggjarnevndin 31. januar 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við mentamálanevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 31. januar 2019:** Tikið av skrá.

# 14/19 06-12 Málslýsing - Hoyvíkar skúli dagføring

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 31.08.2016 | 214/16 | 16/02772-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 16.01.2019 | 13/19 | 16/02772-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 23.01.2019 | 17/19 | 16/02772-1 |
| 4 Býráðsfundur | 31.01.2019 | 14/19 | 16/02772-1 |

**Málslýsing:**
Arbeiðssetningur og arbeiðsbólkur:
Í álitinum um skúlabygnað og skúlabygging árini 2012-2021 ( mál 2011-0679), sum skúlastýrini eisini hava viðgjørt og gjørt viðmerkingar til, er mælt til, at bygnaðurin í Hoyvíkar skúla verður tann sami, umframt at forskúli verður í skúlanum. Mælt er eisini til, at samstarvið millum báðar skúlarnar í Hoyvík um 8. og 9. flokk heldur fram, so næmingarnir í hádeildini hava fleiri valmøguleikar.

Hoyvíkar skúli er ein tvey-sporaður skúli við næmingum úr 1. – 9. fl., umframt frítíðarskúla til fyrsta og annan flokk og tveimum serflokkum. Haraftrat er Klubb 188 í skúlanum.

Viðvíkjandi høvuðsumvæling og dagføring av Hoyvíkar skúla, verður víst til samtyktina frá 26. februar 2015 (mál 14/01124), at arbeiða víðari við ætlan at byggja uppí sjálvan skúlan til tess, at alt skúlavirksemið kann rúmast har, verður harumframt samtykt at játta kr. 445.000 av íløgukarminum til dagføring av skúlum til íløgukontu L41013 Hoyvíkar skúli, høvuðsumvæling og dagføring, til at fáa til vega tørvslýsing, skitsuprojekt og kostnaðarmeting fyri uppíbygging og høvuðsumvæling, herundir hvussu skúlavirksemið kann skipast, meðan byggiarbeiðið fer fram og tíðarætlan tí viðvíkjandi.

Umsitingin hevur í vár havt fundir við leiðsluna í Hoyvíkar skúla um høvuðsumvæling, dagføring og hølistørv. Við støði í teimum fundunum og við støði í álitinum um skúlabygnað og skúlabygging árini 2012-2021, er arbeiðssetningurin hesin:

Hoyvíkar skúli skal høvuðsumvælast og dagførast, so karmarnir eru tíðarhóskandi og pláss er fyri øllum virkseminum í skúlanum.

Í Hoyvíkar skúla skal pláss vera fyri tveimum flokkum í 10 árgangum frá forskúla til og við 9. flokki, fyri tveimum serflokkum og fyri frítíðarskúla frá forskúla til og við 3. flokki. Skúlin ynskir at halda fast við skipanina av hølunum, soleiðis at skilja, at kjarnin er námsfrøðiligur tænastudepil, leiðsla/fyrisiting, starvsfólkarúm, og at næmingar og lærarar ikki hvørva út í lonir, men eru í trimum deplum. Grunddeild forskúli-3.fl., miðdeild 4.- 6.fl., hádeild 7. – 9.fl., og at sertilboðið er í friðarligari eind skúlanum.

Hølini til handverk og list eru ikki nøktandi og ikki nóg nógv, sostatt er neyðugt at útvega fleiri og dagføra tey, sum eru.

Umstøðurnar at eta hjá næmingum og starvsfólkum skulu vera góðar, so ikki er neyðugt at eta í flokshølunum.

Tørvur er á førleikastovu, fleiri fundar- og bólkahølum og námsfrøðiligum tænastudepli.

Klubb 188 er í skúlanum.

Starvsfólkini skulu hava umstøður at ráðleggja og fyrireika í skúlanum, so ikki er neyðugt at gera ein part av arbeiðinum við hús.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at samtykkja arbeiðssetningin og geva umsitingini heimild til at útvega byggiskrá.

**Mentamálanevndin 31. august 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Arbeiðið at gera byggiskrá er komið væl áleiðis, men er ikki gjørt liðugt. Byggiskráin varð sett í bíðistøðu í januar 2018, tí greiði var ikki á løgujáttan til dagføring og høvuðsumvæling av Hoyvíkar skúla. Í langtíðar løguætlanini er nú peningur settur av til verkætlanina frá 2020 og nøkur ár fram. Ætlanin er tí at gera byggiskránna lidna í ár.

Hóast ætlanina at dagføra og høvuðsumvæla Hoyvíkar skúla, er neyðugt at gera ábøtur og umvælingar, áðrenn sjálv høvuðsumvælingin fer í gongd. Átrokandi umvælingar, sum verða gjørdar í 2019, eru umvæling av ávísum útveggjum, tekjan á nýggja bygninginum verður skift, og haraftrat verða nøkur vindeygu skift.

Í sambandi við umvælingarnar í 2019, er ætlanin, at ein partur verður gjørdur, meðan næmingarnir hava frí, so umvælingin órógvar undirvísingina sum minst. Men meginparturin verður væntandi gjørdur, meðan skúlagongd er, og tí má støða takast til, hvussu skúlin verður skipaður, meðan arbeitt verður. Ein møguleiki er at flyta úr tveimum flokshølum, starvsfólkarúminum og hølunum til fyisiting og so brúka kantinuna í Hoyvíkshøllini og møguliga kjallaran í Hoyvíkar kirkju, meðan útveggir verða umvældir. Húsaumsitingin, mentamáladeildin og skúlin samskifta um, hvussu umvæling og skúlagongd verða skipað.

<u>Innbúgv</u>
Fyri at bøta um umstøðurnar serliga í miðhøllini/bókasavninum hevur skúlaleiðslan ynski um at keypa innbúgv, soleiðis at hølini verða hugnaligari og kunnu verða brúkt til fjølbroyttari virksemi, bæði til sosiala samveru í fríløtum, til undirvísing og næmingaarbeiði. Mett verður at 150.000 kr. kunnu setast av til tað. Ætlanin er, at innbúgvið eisini verður brúkt í høvuðsumvælda bygninginum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja, at hildið verður fram við at gera byggiskrá fyri høvuðsumvæling og møguliga útbygging av Hoyvíkar skúla, íroknað frítíðarskúla og forskúla.

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at játta 150.000 kr. av 4175 Dagføring av skúlum til innbúgv til Hoyvíkar skúla.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 16. januar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 23. januar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 31. januar 2019:** Einmælt samtykt.

# 15/19 Hølisviðurskifti o.a. - Havnar Telvingarfelag

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 14.05.2018 | 165/18 | 17/00846-3 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2018 | 256/18 | 17/00846-3 |
| 3 Fíggjarnevndin | 23.01.2019 | 13/19 | 17/00846-3 |
| 4 Býráðsfundur | 31.01.2019 | 15/19 | 17/00846-3 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.02.2019 | 24/19 | 17/00846-3 |

**Upprunin til málið:**
Fyrispurningur frá Havnar Telvingarfelag (HT).

**Lýsing av málinum – samandráttur**
HT hevur egin høli í R. C. Effersøes gøtu, har ovara hæddin verður leigað út, meðan ávíst felags virksemi er í veghæddini, men í løtuni avmarkað nýtsla vegna, at tey eru í ringum standi. Felagið ynskir dialog við kommununa um framtíðar høliskarmar til virksemi felagsins.

Meginparturin av virksemi felagsins er í løtuni í Eindini á Landavegnum hjá Skúlanum á Fløtum (Guli skúli). Limatalið er umleið 100, harav umleið 60 aktivar telvarar (sí styrkilista http://faroechess.com/?p=3222 , umframt eini 40 børn, ið telva.
Felagið klárar sær væl í heimligu kappingunum, umframt at felagið er heimafelagið hjá stórmeistaranum Helga Dam Ziska.

Hús í R.C. Effersøes gøtu í ringum standi. Leiga út í ovaru hæddunum og telving hevur verið í veghæddini.
Felagið ynskir sær framhaldandi egin høli, tí tá meta tey tað ber betri til at fáa ognar- og felagsskapskenslu. Meta at tørvurin er umleið 80-100 $m^2$. Felagið er skuldarfrítt, eigur nakað av tøkum peningi. Harumframt er húsaogn felagsins skuldarfrí. Felagið metir ikki tað er skynsamt at umvæla verandi hús, men heldur gera nakað sum er gjørt til endamálið og har tað so eisini kann vera ávís útleiga av rest fermetrum.

Felagið hevur sett fram ynski um at fáa hóskandi lendi til at byggja nýtt felagshús t.d. sum bygningur á leigað lendi. TK eigur fleiri ymisk lendi, ið kundu komið uppá tal.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ongar.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Ongar.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Mál 16/01316 viðv. brigdehúsinum.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Ongi.

**Umhvørvisárin**
Avmarkað.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

Ongar.

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávisar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingar avleiðingar | | | | |
| Unhvørvis avleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at heita á Byggi- og býarskipanarnevndina um at finna hóskandi lendi til at langtíðarleiga til nýtt hús til telvingarfelagið. Málið verður beint í Byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Tekniska fyrisiting og trivnaðarfyrisitingin hava reist málið 18/03453 Skipan av Gundadali, ið snýr seg um at fáa uttanhýsis ráðgeva til at menna eina heildarætlan yvir ítróttarøkið í Gundadali.

Í økinum halda flestu ítróttagreinar til, og skal heildarætlanin rúma øllum virksemi á økinum, umframt møguligum nýggjum virksemi og hetta kundi t.d. verið Talvfelagið.

Í hesum sambandi hevur býarskipanardeildin mælt til, at uttanhýsis ráðgevin, ið kemur at standa fyri verkætlanini, skal kanna og finna uppskot til staðsetingar til feløg, ið náttúruliga kunnu leggjast saman m.a. Talvfelagið og feløgini í Bridgehúsinum.

Í málinum **18/03453 Skipan av Gundadali** verður skrivað soleiðis:

*“Bridgehúsið er í vánaligum standi, og verður tikið niður í sambandi við útbygging av Tórsvølli. Ynskiligt er at finna nýggja staðseting til talv- og bridgehúsið. Um tað ikki verður staðsett í Gundadalsøkinum, so skal onnur staðseting finnast til virksemið. Víst verður til j.nr. 16/01316.”*

Í málinum **16/01316-10 Vegna nevndina í Bridgehúsinum Pól E. Egholm: Umbøn um fund viðvíkjandi Brigdehúsinum í Gundadali** verður skrivað soleiðis:

*“Feløgini (í Bridgehúsinum) eru sinnaði at samstarva um hóskandi loysnir, og eisini um talan skal verða um, at byggja út og deila hølini við t.d. Talvfelagið.”*

Talvfelagið er komið við uppskotum til staðseting av nýggjum húsi til felagið (sí kortskjal 17/00846-07 – Uppskot frá Talvfelagnum um staðseting). Hetta yvirlitið er eitt gott arbeiðsskjal, um mett verður at felagið ikki skal staðsetast í Gundadali. Í sambandi við at kanna møguleikan fyri at hýsa Talvfelagnum, Bridgehúsinum og møguliga einum triðja parti á sama stað verður mælt til at umsitingin fer í samráðingar við Talvfelagið um hetta.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at heimila umsitingini at samráðast við feløgini um at húsast í felags hølum, og at samtykkja at lata uppgávuna um staðseting av Talvfelagnum til ráðgeva, ið stendur fyri málinum “Skipan av Gundadali” og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 23. januar 2019:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 31. januar 2019:** Einmælt samtykt.

## 16/19 Gøtunavn til innkoyringarveg frá Glyvursvegi til “Undir Kongavarða” og “Við Klingurstjørn”

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Gøtunavnanevndin | 30.10.2017 | 6/17 | 17/03498-2 |
| 2 Gøtunavnanevndin | 26.02.2018 | 1/18 | 17/03498-2 |
| 3 Gøtunavnanevndin | 30.04.2018 | 2/18 | 17/03498-2 |
| 4 Mentamálanevndin | 14.05.2018 | 175/18 | 17/03498-2 |
| 5 Býráðsfundur | 24.05.2018 | 124/18 | 17/03498-2 |
| 6 Mentamálanevndin | 06.06.2018 | 202/18 | 17/03498-2 |
| 7 Gøtunavnanevndin | 23.10.2018 | 5/18 | 17/03498-2 |
| 8 Mentamálanevndin | 07.11.2018 | 336/18 | 17/03498-2 |
| 9 Býráðsfundur | 31.01.2019 | 16/19 | 17/03498-2 |

**Lýsing av málinum – samandráttur:**

Umhvørvisstovan hevur sent áheitan til Teknisku deild hjá Tórshavnar kommunu um at broyta gøtunavnið “Undir Kongavarða” soleiðis, at teinurin frá Glyvursvegi til ”Undir Klingrutjørn” og víðari fær sítt egna navn. Vegurin er vístur við reyðum á hjáløgdu mynd.

**Gøtunavnanevndin 30. oktober 2017:** Málið varð umrøtt og verður viðgjørt aftur á næsta fundi.

**Ískoyti:**
Sambært skrivi frá teknisku deild 20.02.2018 er í fyrsta umfari neyðugt at fáa eitt nýtt navn til innkoyringarvegin frá Glyvursvegi og niðan til nýggja býlingin "Við Klingrutjørn". Samstundis verður sagt frá, at Umhvørvisstovan viðmælir, at nýggja útstykkingin í framhaldi av vegnum fær sama veganavn.

**Gøtunavnanevndin 26. februar 2018:** Nevndin ynskir ein ástaðarfund og meira kunning um, um fleiri útstykkingar verða frá sama vegi og hvørjar ætlanir eru á økinum yvirhøvur.

**Ískoyti:**
Fundurin 30.04.2018 byrjar við ástaðarfundi, har nevndin fær kunning frá staðkendum argjamanni og einum starvsfólki á tekniska økinum hjá kommununi.

**Gøtunavnanevndin 30. apríl 2018:** Nevndin mælir til, at vegurin frá Glyvursvegi til endan á nýggju útstykkingini eisini fær navnið «Við Klingrutjørn».

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við tilmælinum frá gøtunavnanevndini og beina málið í býráðið.

**Mentamálanevndin 14. mai 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. mai 2018:** Atkvøtt varð um uppskot frá Marin Katrinu Frýdal um at beina málið aftur í mentamálanevndina, ið varð einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Sambært almenna staðarnavnamyndugleikanum er navnið á tjørnini, ið vegurin er uppkallaður eftir, Klingrutjørn. Mest hóskandi er, at vegarnavið og tjarnarnavnið hava sama málsliga framburð. Skal hetta ikki vera so, er skilabest at heita á Staðarnavnanevnd landsins um at broyta tjarnarnavnið fyrst.

**Mentamálanevndin 06. juni 2018:** Samtykt at heita á Staðarnevnanevnd landsins um at taka málið upp til nýggja viðgerð.

**Ískoyti:**
Eftir áheitan frá teknisku fyrisiting verður málið tikið upp til nýggja viðgerð. Málið snýr seg um at seta navn á innkoyringarvegin frá Glyvursvegi niðan til og við nýggju útstykkingina, sum er í gerð. Umhvørvisstovan og tekniska fyrisiting hjá kommununi mæla til, at innkoyringarvegurin frá Glyvursvegi og seinna útstykkingin fáa sama navn, t.v.s. at *Undir Kongavarða* og *Við Klingrutjørn/Klingurstjørn* verða síðuvegir til hendan vegin.

Spurningurin um navnið Klingrutjørn ella Klingurstjørn til fyrru útstykkingina verður viðgjørdur í máli 16/03091.

**Gøtunavnanevndin 23. oktober 2018:** Nevndin mælir til navnið Andrasarbreyt, eftir niðursetumanninum Andras Mortanssyni.

Skotið verður upp at undirskelti verður sett upp við fulla navni Andrasar og øðrum upplýsingum.

**Ískoyti:**
Eitt kort við heitinum "*Kort - nýtt veganavn á Argjum"* er hjálagt. Tað vísir vegin, sum talan er um, við reyðari striku.

**Tilmæli:**
Ávísur vandi kann vera fyri blandi við Andrasargøtu í Hoyvík og kundi tí eisini verið umhugsað at kalla vegin fyri ‘Andrass Mortanssonar breyt’.

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til tilmælini.

**Mentamálanevndin 07. november 2018:** Samtykt at kalla vegin «Andrass Mortanssonar breyt» og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 31. januar 2019:** Fyrst varð atkvøtt um uppskot um at beina málið aftur í mentamálanevndina, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri og tveimum atkvøðum ímóti.

Fyri atkvøddu: Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Sjúrður Olsen, Bergun Kass, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Bjørg Dam, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen og Gunvør Balle.

# 17/19 Val av limum í valstýrið fyri løgtings- og fólkatingsval á Argjum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 19.03.2015 | 55/15 | 15/00865-1 |
| 2 Býráðsfundur | 31.01.2019 | 17/19 | 15/00865-1 |

**Málslýsing**:

**Býráðsfundir 19. mars 2015:** Vald vórðu Gunnar Reynslág, Zacharias Johansen, Birgit Andersen og Valbjørn Dalsgarð.

**Ískoyti:**
Sambært lóg um val til løgting § 20 er ásett:

*«Atkvøðugreiðslan á hvørjum valstaði verður fyriskipað undir leiðslu av einum valstýri, sum sett er av kommunustýrinum. Hoyra bygdir úr ymsum kommunum til sama valstað, ger landsstýrismaðurin av, hvussu nógvar limir avvarðandi kommunur skulu velja. Stýrið hevur í minsta lagi 3 og hægst 5 limir og skipar seg sjálvt. Valstýrið førir gerðabók, sum kommunustýrið lóggildir"*

og í lov om folketingsvalg på Færøerne §19 er ásett:

*«Senest når valg er udskrevet, vælger kommunalbestyrelsen for hvert valgdistrikt mindst 3 og højst 5 valgstyrere til at forestå afstemningen og stemmeoptællingen på valgstedet.»*

Zacharias Johansen hevur boðað frá, at hann tekur seg úr valstýrinum.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til at velja nýggjan lim í valstýrið fyri Zacharias Johansen.

**Býráðsfundur 31. januar 2019:** Sólrún Gleðisheygg varð vald í valstýrið.

## 18/19 Staðseting av nýggjum og víðkan av verandi dagstovnum 2019

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 27.11.2018 | 76/18 | 18/03848-1 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2018 | 252/18 | 18/03848-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 30.01.2019 | 33/19 | 18/03848-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 31.01.2019 | 25/19 | 18/03848-1 |
| 5 Býráðsfundur | 31.01.2019 | 18/19 | 18/03848-1 |

**Upprunin til málið:**
Mentamáladeildin reist málið um útvegan av fleiri dagstovnaplássum innan august 2019.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Ein arbeiðsbólkur umboðandi trivnaðarfyrisitingina og teknisku fyrisitingina hevur gjørt uppskot til eina loysn uppá bráðfeingis tørvin á dagstovnaplássum.

Tørvur er á umleið 170 plássum innan 2019 og uppskot er um at:

- Byggja nýggjan stovn í Stórubrekku í Hoyvík við seks stovum (3 barnagarðsstovur og 3 vøggustovur, tils. 108 nýggj pláss). Skal verða liðugur áðrenn august 2019.
- Útbyggja Býlingshúsið Vesturi á Flat í Hoyvík við fýra stovum (2 vøggustovur og 2 barnagarðsstovu, tils. 44 pláss nýggj). Skal verða liðug sum skjótast.
- Útbyggja dagstovnin á Argjahamri á Argjum við tveimum stovum (1 vøggustovu og 1 barnagarðsstovu, tils. 32 nýggj pláss). Skal vera liðug sum skjótast.

Samanlagt gevur hetta 184 pláss, ið er 14 pláss yvir tann framroknaða tørvin

Haldgóðar loysnir skulu finnast beinanvegin og í hesum sambandi má atlit takast til bráðfeingis tørvin á dagstovnaplássum og støðuna hjá byggivinnuni, ið hevur ordrabøkurnar sera fullar í hesum døgum.

Tí er uppskot um at flyta inn liðugt bygd dagstovnamodulir at seta saman. Vøruavgreiðslan upp á dagstovnamodulir er nakrar mánaðir.

Býarskipanarligt verður tikið atlit til útsjóndina á modulunum, soleiðis at tær passa inn í nærumhvørvi og stovnin tær verða lagdar afturat. Í hesi tilgongd verður somuleiðis tryggja at útsjónd og tilskapanin av modulunum tekur støði í tí einstaka barninum og námsfrøðinginum soleiðis, at tey námsfrøðiligu virðini verða í hásæti.

Húsaumsitingin sendir fyrispurning um tilboð til útvegara av dagstovnamodulum til nýggjan stovn í Stórubrekku og útbyggingina av dagstovnastovum Vesturi á Flat og á Argjahamri.

**Útbygging av býlingshúsið Vesturi á Flat:**
Skotið verður upp at útbyggja stovnin við dagstovnamodulum, suðureftir. Somuleiðis verður skotið upp at vaksa um verandi matrikul og harvið garðøkið soleiðis, at Tórshavnar kommuna kann verða framskygd um tørvurin skuldi blivið enn størri í framtíðini. Við hesum er ein víðkan av verandi matrikli við 3641 fermetrum neyðug, sí kortskjal 18/03848-2 Býlingshúsið Vesturi á Flat2. Í hesum sambandi verður eisini kannað í hvønn mun parkeringsøkið og spæliplássið skal víðkast og hvar tað nýggja skýlið til barnavognar skal staðsetast.

Eigari av lendinum er Tórshavnar kommuna, og tí er ein sundurbýting til samanlegging av matriklinum, at senda til Umhvørvisstovuna til avgreiðslu, tað einasta ið krevst. Byggisamtyktin fyri økið er A1, ið er lág bústaðarbygging, Í sambandi við bústaðarøki kann byggivaldið geva serloyvi til annað virksemi t.d. stovnar

**Útbygging av dagstovni á Argjahamri:**
Skotið verður upp at útbyggja stovnin á Argjahamari suður/eystureftir. Somuleiðis verður skotið upp at vaksa um verandi matrikul og harvið garðøkið. Við hesum er ein víðkan av verandi matrikli suður/eystureftir við 1752 fermetrum neyðug, sí kortskjal 18/03848-3 Dagstovnur á Argjahamri2. Í hesum sambandi verður eisini kannað í hvønn mun parkeringsøkið og spæliplássið skal víðkast og hvar tað nýggja skýlið til barnavognar skal staðsetast.

Eigari av lendinum er Búnaðargrunnurin/Búnaðarstovan og festari er Poul Müller bóndi. Næsta stig er at taka upp samráðingar við Búnaðarstovuna um keyp av lendi, fyri síðani at senda eina umsókn um sundurbýti til samanlegging av matriklinum til Umhvørvisstovuna til avgreiðslu. Byggisamtykt fyri økið er A3, ið er lagt av til blandaða bústaðarbygging, har loyvt eisini er at byggja stovnar.

Ætlanin er at taka uppaftur verkætlan frá 2017, ið Kontrast gjørdi fyri Tórshavnar kommunu um útbygging av dagstovni á Argjahamri, sí journal nr. 18/03848-7 Uppskot frá Kontrast. Sum áður nevnt er ætlanin at biðja um tilboð uppá útbyggingina úr dagstovnamodulum, um hetta ikki kann lata seg gera, er ætlanin at biðja um tilboð frá byggivinnuni uppá útbyggingina í byggielementum.

**Grundøkið í Stórubrekku til nýggjan stovn:**
Mett verður, at tørvur er á einum grundstykki, har til ber at byggja ein stovn upp á uml. 1100 fermetrar.

Býarskipanarliga hevur umsitingin umrøtt spurningin um øki til nýggjan dagstovn og vísir á eitt øki á eystaru síðu av Stórubrekku í Hoyvík, sí kortskjal 18/03848-4 Dagstovnur í Stórubrekku3 og 18/03848-8 Dagstovnur í Stórubrekku. Økið er ein partur av Dalinum Langa í Hoyvík, sum í Kommunuætlanini 2014 varð lagt út sum býarvakstrarøki. Selmar Nielsen Arkitektar hevur gjørt eitt uppskot uppá skipanina av økinum, sí journal nr. 18/03848-5 Skipan av Stórubrekku.

Hoyvík er ein býarpartur við eini støðugari menning og er tann býarparturin í Tórshavnar kommunu við flestu barnafamiljum. Við eini útstykking í Stórubrekku, kann hugsast at tað koma enn fleiri barnafamiljur, og tí vildi ein dagstovnur egna seg sera væl í hesum økinum.

Eigari av lendinum er Tórshavnar kommuna, og tí er ein umsókn um sundurbýting av matriklinum, at senda til Umhvørvisstovuna til avgreiðslu, tað einasta ið krevst. Byggisamtyktin fyri økið er A3, ið er lagt av til blandaða bústaðarbygging, har loyvt eisini er at byggja stovnar.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið í Stórubrekku er ogn hjá Tórshavnar kommunu, sí journal nr. 8/03848-6 Stórabrekka og somuleiðis er økið á Argjum. Økini liggja, í umráðispartinum A3 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, har ásetingarnar eru:

1. Økið verður lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava handlar, smáhandverk og minni virkir, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt.
2. Útstykkingar kunnu bert gerast sambært serstakari byggisamtykt.
3. Grundstykkini skulu verða í minsta lagi 400 m$^2$ fyri stakhús, 300 m$^2$ fyri tvíhús og 250 m$^2$ fyri raðhús. Ein partur av hesum kann leggjast sum fríøki, tó í mesta lagi 100 m$^2$ fyri hvørt grundstykki.
4. Byggistig 0,3.
5. Nýtslustigið má ikki fara upp um 0,6 fyri stakhús og 0,7 fyri tvíhús, ella raðhús. Tó kann tað fyri grundstykkir, sum eru 200 m$^2$, fara upp til helvtina hægri og fyri stykkir millum 200 m$^2$ og 500 m$^2$ verða sett javnt minkandi niður til vanliga ásetta minstuvídd. Í serstakari byggisamtykt kann nýtslustigið verða roknað út frá heildarbyggingini í mun til eitt natúrliga avmarkað øki.

Økið á Flat er ogn hjá Tórshavnar kommunu og liggur í umráðispartinum A3 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, har ásetingarnar m.a. eru:

1. Loyvt er einans at byggja stakhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð, og eftir serloyvi frá byggivaldinum tvíhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð og raðhús og tílíkar bústaðir fyri eitt húski.

   Í sambandi við bústaðarøki kann byggivaldið geva serloyvi til annað virksemi sum handlar, smærri vinnuvirki og stovnar, ið natúrliga hoyra býlinginum til, treytað av, at hetta ikki er til ampa ella spillir dámin á økinum sum sethúsabýlingur og sum lúka treytirnar í flokking av vinnuvirkjum í Tórshavnar kommunu.

4. Byggistigið má ikki fara upp um 0,3

5. Nýtslustigið má ikki fara upp um 0,6 fyri stakhús og 0,7 fyri tvíhús, ella raðhús. Tó kann tað fyri grundstykkir til stakhús, sum eru 200 m$^2$ ella minni, fara upp til helvtina hægri og fyri stykkir millum 200 m$^2$ og 500 m$^2$ verða sett javnt minkandi soleiðis, sum mynd 3 vísir.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
18/03521 Útvega fleiri dagstovnapláss
17/03897 Bráðfeingis tørvur á dagstovnaplássum

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Viðmerkingar frá Teknisku deild:**
Fyri allar byggingarnar er galdandi, at atlit má takast fyri ferðslu, atkomuviðurskiftum og parkering.

Tekniskar leiðingar o.a.: Í sambandi við gerð av verkætlan er neyðugt at kanna avvatning, regn- og skittvatnskloakk umframt aðrar tekniskar innleggingar.

**Dagstovnur í Stórubrekku**
Ferðsluviðurskifti:
Verandi uppskot vísur á tvær íbindingar, ein við vegamótið Ovara Gøta_Klingran, og ein longur niðri áraka matr. nr. 1xb. Sí kortskjal 18/03848-09 Dagstovnur_Stórabekka_Vegaíbinding_Kloakkíbinding.
Mælt verður til heldur at gera eina íbinding í Klingruna áraka miðskeiðis av matr. nr. 1xb. Íbindingin á vegamótinum Ovara Gøta_Klingran má ikki vera x-krossur.
Skal atkoman vera her, má vegamótið gerast við eini rundkoyring ella ljósregulering.

Atlit má takast til yvirflatuvatnstrupulleikar, serliga her í økinum.

**Dagstovnur á Argjahamri**
Yvirflatuvatn: Ígjøgnum grundøkið gongur eitt gil, har nógv vatn rennur. Atlit mugu takst til hendan trupulleika.

**Dagstovnur á Flat:** Sí viðmerkingarnar omanfyri.

**Skjøl**
18/03848-2 Býlingshúsið Vesturi á Flat2
18/03848-3 Dagstovnur á Argjahamri2
18/03848-7 Uppskot frá Kontrast
18/03848-4 Dagstovnur í Stórubrekku3
18/03848-5 Skipan av Stórubrekku
18/03848-6 Stórabrekka
18/03848-8 Dagstovnur í Stórubrekku
18/03848-09 Dagstovnur_Stórabekka_Vegaíbinding_Kloakkíbinding_22112018_PAP

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | x | x | x |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | x | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | x | | x |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til, at nevndin góðtekur uppskot til staðseting av:
- nýggjum dagstovni í Stórubrekku, matr. nr. 138a, Hoyvík
- útbygging av dagstovninum á Argjahamri, matr. nr. 43a/4gq, Argir
- útbygging av býlingshúsinum Vesturi á Flat, matr. nr. 140a/1xæ, Hoyvík.

Eisini verður mælt til at heimila umsitingini at fara í samráðingar við Búnaðarstovuna um at keypa part av matr. 4a., Argir til endamálið.

Eisini verður mælt til at senda umbøn til Umhvørvisstovuna til avgreiðslu og at viðmæla hesum:

- at sundurbýta umleið 3641 fermetrar av matr. 140a, Hoyvík, at leggja saman við matr. 1xæ, Hoyvík (Á Flat)
- at sundurbýti umleið 4450 fermetrar av matr. 138a, Hoyvík (Stórabrekka).
- at sundurbýta umleið 1752 fermetrar av matr. 43a, Argir, at leggja saman við matr. 4gq, Argir.

Harafturat verður mælt til at heimila umsitingini at byrja at gera ítøkiligar verkætlanir til hesi trý øki og at beina málið í mentamálanevndina og býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 27. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Mentamálanevndin 30. januar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 31. januar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 31. januar 2019:** Gunvør Balle setti fram sóljóðandi broytingaruppskot:

Mælt verður til at atkvøða um staðseting av dagstovninum á Argjahamri og býlingshúsinum Vesturi á Flat.

Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskotið frá Gunvør Balle, ið varð einmælt samtykt.

Turið Horn luttók ikki í viðgerðini av málinum vísandi til, at hon er ógegnig.

# 19/19 Umsókn um broyting av byggisamtykt til A1 øki í samband við makaskifti millum matr. nr. 157 og matr. nr. 92a, Kollafirði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 16.01.2019 | 2/19 | 17/03594-2 |
| 2 Býráðsfundur | 31.01.2019 | 19/19 | 17/03594-2 |

**Upprunin til málið:**
Búnaðarstovan hevur sent Tórshavnar kommunu umsókn vegna bóndan í Homrum í Kollafirði, har ynski er at fáa loyvi til at skifta um matr. nr. 157, sum eru 3 stykkir við økið rundanum matr. nr. 92b, sum eru hansara sethús á Tungu.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Fyri at umbýtið kann verða framt millum Búnaðarstovuna og festaran, má byggisamtyktin broytast soleiðis, at økið verður broytt frá at vera D1 (almenning, náttúrufriðingar- og mentunarlig endamál) til A1 (bústaðarøki).
Økið er 3.258 m$^2$ til støddar.

Stykkið, sum húsini standa á, er undir 100 m$^2$ og verður uppskotið framt í verki, fær festarin 400 m$^2$ afturat, soleiðis at hann fær hóskandi grundstykki til húsini.
Ein festari kann keypa lendi sambært lógini um løgtingslógini um landsjørð, § 6.

Í sambandi við viðgerðina av umsóknini um at broyta byggisamtyktina fyri matr. nr. 92b, Kollafjørður, hevur umsitingin hjá kommununi havt eitt størri øki omanfyri nýggju útstykkingina í Hamrabøi við í viðgerðini, sí kortskjal *Eftir broyting*. Í økinum eru matr. nr. 92b (privatur eigari), matr. nr. 99 (privatur eigari) og matr. nr. 92a (Búnaðarstovan). Skotið verður upp, at økið, sum er víst á viðhefta kortskjali *Eftir broyting*, verður broytt frá D1 øki og 4. Grundumráði til A1 øki, ætla bústaðabygging. Eftirspurningurin eftir sethúsagrundøkjum í kommununi er stórur, øll stykkini í kommunalu útstykkingini við Hamrabø eru umbiðin, og hevði hettar økið ligið sum ein natúrlig leinging av bústaðarøkinum, sum er.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingarnar fyri D1, A1 og 4. Grundumráðið í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu eru:

Kap. 4, §5. Ásetingar fyri umráðispartarnar A1 í 3. grundumráði
*Stk. 1. Loyvt er einans at byggja stakhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð, og eftir serloyvi frá byggivaldinum tvíhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð og raðhús og tílíkar bústaðir fyri eitt húski.*

*Kap. 4, §23. Ásetingar fyri umráðispartar D í 3. Grundumráði*
*Stk. 1. Umráðispartarnir D1 verða í síni heild lagdir til almenning, náttúrufriðingar- og mentunarlig endamál og tílíkt. Økið fram við Hoydalsá kann einans verða skipað og bygt sambært serstakari bygisamtykt fyri økið.*
*Stk. 2. Bygging í D1 kann bert loyvast sambært serstakari byggisamtykt, sum er í samsvar við stk. 1.*

Kap. 4, §26. Ásetingar fyri 4. Grundumráði

*Stk. 1. 4. Grundumráði verður í høvuðsheitum nýtt til landbúnað og alment frílendi og tílíkt.*

Løgtingslóg um landsjørð, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 66 frá 15. mai 2014:
**§ 6.** [2)] *Festari kann keypa innstøðu, sethús, fjós og aðrar bygningar við hóskandi undirlendi, sum hoyra til festið. Sethús kann hann keypa sjálvur ella saman við hjúnafelaga. Undantiknir keypsrættinum eru bygningar o.a., sum hava serligan fornfrøðiligan ella annan týdning fyri landið at eiga. Landsstýrismaðurin ásetir í kunngerð nærri reglur viðvíkjandi sølu til festara, uppi í hesum, hvat er undantikið at kunna seljast.*

**Upplýsingar frá umsitingini**
Ongar viðmerkingar

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Ongar viðmerkingar

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Ongar viðmerkingar

**Umhvørvisárin**
Ongar viðmerkingar

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Umsitingin hevur verið í samband við eigaran av matr. nr. 99, Kollafjørður, sum ynskir, at hennara ogn verður partur av hesi broyting, og verður broytt frá 4. Gurndumráði til A1 øki.

Hoyringsskriv er sent Búnaðarstovuni og hava teir onga viðmerking til broytingina.

**Skjøl**
*Eftir broyting,* journal nr. 17/03594-10.
*Áðrenn broyting,* journal nr. 17/03594-10.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís øki í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingar avleiðingar** | | | | |
| **Unhvørvis avleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☒**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at broyta almennu byggisamtyktina sambært kortskjølunum, soleiðis at eigarin fær grundstykki til húsini, og festarin og Búnaðarstovan kunnu fremja umbýti og matrikuleru viðurskiftini fáast í rættlag og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 16. januar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 31. januar 2019:** Einmælt samtykt.

Marin Katrina Frýdal luttók ikki í viðgerðini av málinum, vísandi til at hon er ógegnig.

# 20/19 Broyting av almennu byggisamtyktini, Dalurin Langi, matr. nr. 138a, Hoyvík frá A3 til D1

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 16.01.2019 | 5/19 | 18/04229-1 |
| 2 Býráðsfundur | 31.01.2019 | 20/19 | 18/04229-1 |

**Upprunin til málið:**
Tórshavnar býráð samtykti á fundi tann 20. juni 2017 nýggja bústaðar útstykking, Stórubrekku, í tí sambandi er ynski at fáa Dalin Langa lagdan um til fríøki. Fyri at tryggja eitt grønt umhvørvi millum býlingarnar Stórubrekku og Myllutjørn, ið er til gagns fyri almenningin. Dalurin Langi skal vera eitt hugtakandi og spennandi samanhangandi grønt øki, ið er lætt at greina og fata, ið tryggjar almenninginum fjølbroytt fríøkir ímillum býlingarnar.

Fyri at fremja hetta átak, er neyðugt við tillagingum í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar Kommunu.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Skipa økið um, Dalin langa frá A3, bústaða- og miðstaðarbygging til D1, fríøki.

Økið, sum broytingin fevnir um, liggur í A3 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, sí skjal *1 - Dalurin Langi áðrenn broyting* og *2 - Dalurin Langi eftir broyting.*

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið er ogn hjá Tórshavnar kommunu.

Ásetingar fyri D1 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a.:

*1 Umráðispartarnir D1 verða í síni heild lagdir til almenning, náttúrufriðingar- og mentunarlig endamál og tílíkt. Økið fram við Hoydalsá kann einans verða skipað og bygt sambært serstakari bygisamtykt fyri økið.*

*2 Bygging í D1 kann bert loyvast sambært serstakari byggisamtykt, sum er í samsvar við stk. 1.*

Ásetingar fyri A3 í 3. grundumráði í almennu byggisamtyktini eru m.a.:

*1 Økið verður lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava handlar, smáhandverk og minni virkir, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt.*

*2 Útstykkingar kunnu bert gerast sambært serstakari byggisamtykt.*

*3 Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 400 m2 fyri stakhús, 300 m2 fyri tvíhús og 250 m2 fyri raðhús. Ein partur av hesum kann leggjast sum fríøki, tó í mesta lagi 100 m2 fyri hvørt grundstykki.*

*4 Byggistig 0,3*

*5 Nýtslustigið má ikki fara upp um 0,6 fyri stakhús og 0,7 fyri tvíhús, ella raðhús. Tó kann tað fyri grundstykkir, sum eru 200 m2, fara upp til helvtina hægri og fyri stykkir millum 200 m2 og*

*500 m2 verða sett javnt minkandi niður til vanliga ásetta minstuvídd. Í serstakari byggisamtykt kann nýtslustigið verða roknað út frá heildarbyggingini í mun til eitt náttúrliga avmarkað øki.*

*6 Hús við vanligari mønureising mugu einans verða bygd í tveimum hæddum umframt nýttum lofti og mugu ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt við útvegg og 9 m til mønuna. Kjallari verður roknaður sum húsahædd. .*

*7 Verða hús bygd við einvegis takhalli ella sløttum taki kann tann lægra síðan í mesta lagi verða 6 m til hægsta punkt við útvegg og tann hægra síðan í mesta lagi verða 7,5 m.*

*8 Er hægsta punkt við útvegg meira enn 6 m, skal frástøðan frá marki økjast við somu longd, sum hægsta punkt er hægri enn 6 m.*

*9 Í serstakari byggisamtykt kann víkjast frá tal av hæddum og verða loyvt at byggja hægri og fyriskipað at húsini verða sett í veglinju ella byggilinju, (víkja frá ásettu byggi- og nýtslustigunum og minstu grundstykkjavídd).*

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
- 17/01822 Klik her for at angive tekst.
- Sí *Staðseting av nýggjum og víðkan av verandi dagstovnum 2019, journal nr. 18/03848*

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
- *1 - Dalurin Langi áðrenn broyting, journal nr. 18/04229-2.*
- *2 - Dalurin Langi eftir broyting, journal nr. 18/04229-2.*

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja broytingina av almennu byggisamtyktini sambært kortskjølunum og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 16. januar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 31. januar 2019:** Einmælt samtykt.

## 21/19 Bústaðir. Umsókn um at leiga part av Kommunuskúlanum til lestraríbúðir.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 21.05.2015 | 141/15 | 15/01465-2 |
| 2 Býráðsfundur | 21.05.2015 | 87/15 | 15/01465-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 10.06.2015 | 162/15 | 15/01465-2 |
| 4 Býráðsfundur | 22.06.2015 | 124/15 | 15/01465-2 |
| 5 Fíggjarnevndin | 28.09.2015 | 191/15 | 15/01465-2 |
| 6 Býráðsfundur | 30.09.2015 | 155/15 | 15/01465-2 |
| 7 Fíggjarnevndin | 21.10.2015 | 264/15 | 15/01465-2 |
| 8 Fíggjarnevndin | 20.01.2016 | 24/16 | 15/01465-2 |
| 9 Fíggjarnevndin | 28.01.2016 | 41/16 | 15/01465-2 |
| 10 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 13/16 | 15/01465-2 |
| 11 Fíggjarnevndin | 19.04.2016 | 153/16 | 15/01465-2 |
| 12 Býráðsfundur | 19.04.2016 | 102/16 | 15/01465-2 |
| 13 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 136/16 | 15/01465-2 |
| 14 Fíggjarnevndin | 12.12.2017 | 313/17 | 15/01465-2 |
| 15 Býráðsfundur | 14.12.2017 | 319/17 | 15/01465-2 |
| 16 Fíggjarnevndin | 23.01.2019 | 5/19 | 15/01465-2 |
| 17 Býráðsfundur | 31.01.2019 | 21/19 | 15/01465-2 |

**Málslýsing**:
**Umsókn um langtíðarleigumál:**
Bústaðir, Føroya Bústaðarfelag, søkir kommununa um at kunna leiga part av Kommunuskúlanum til lestraríbúðir.

Talan er um ein part av lonini, sum vendir móti Sjúrðargøtu/Tróndargøtu, umleið 1.440m² til samans, har ætlanin er at byggja lestraríbúðir.

Bústaðir ynskir at kunna leiga henda partin av bygninginum sum hann stendur, og ber Bústaðir allan kostnaðin av umbygging til íbúðirnar, bæði innan og uttanveggja, t.v.s. at Bústaðir ber allar útreiðslur til verkætlanina.

Bústaðir ynskir leigumál yvir 30 ár, har bústaðir átekur sær at umbyggja og viðlíkahalda lonina í sama tíðarskeiði.

Talan er um eina stóra verkætlan og metir Bústaðir tað vera rættast at lyfta umbyggingina í stigum. Bústaðir er til reiðar at luttaka í tí heildarætlan sum umfatar aðrar partar av skúlanum bæði tí ynskiligt er at fleiri leigubústaðir skulu gerast og tí, at umbyggingar og umvælingar fyri allan skúlan væntandi skulu gerast í einum, t.d. at skifta tak og at skipa uttanum økini.

Bústaðir vísir til fund við stjórn, har avtalað varð at seta ein arbeiðsbólk ið skal lýsa verkætlanina nærri, og skal arbeiðsbólkurin gera eitt tilmæli til stýrið hjá Bústøðum og til politisku skipanina.

Taks setir treytir um talan skal gerast um mvg-frítøku.
Síðani Bústaðir sendi kommununi umsóknina um leigumálið, hevur TAKS víst á, at um Bústaðir skal hava mvg. frítøku fyri umvæling av kommunuskúlanum, er neyðugt at Bústaðir eigur bygningin, tí TAKS krevur tinglýst veð í bygninginum fyri mvg. frítøkuna.

Bústaðir kannar um til ber at sleppa undan hesi reglu, men um undantak ikki fæst, søkir Bústaðir at keypa partin av Kommunuskúlanum fyri 1. kr. og fær kommunan tá forkeypsrætt, til ein frammanundan mettan prís.

Í løtuni ber tí ikki til at siga, um talan kann gerast um langtíðarleigumál ella um møguliga sølu við kommunalum forkeypsrætti.

Langtíðarleiga/Søla uttan alment útboð.
Sambært svarskrivi sum kommunan fekk frá Innlendismálaráðnum 11. apríl 2013, í samband við at kommunan søkti um loyvi til sølu av lendi til Bústaðir framgongur, at Bústaðir skal javnsetast við almennan mynduleika, og at til ber at selja ognir til Bústaðir uttan at ognirnar verða boðnar alment út.

Onnur formlig viðurskifti:
Møguligt søla/leiga av parti av kommunuskúlanum krevur at hesin parturin verður frámatrikuleraður, og kann tí gerast talan um at kommunan selir umsókta partin av skúlanum, og langtíðar leigar undirlendið.

Sambært samrøðu við Umhvørvisstovuna framgongur, at til ber at frámatrikulerað part av skúlanum til nýtt matrikul nr. treytað av brunagóðkenning. ( Krøv um brandmúr v.m )

**Tilmæli:**
Málið verður lagt fyri fíggjarnevnd til umrøðu og møguliga støðutakan.

**Fíggjarnevnd 21. maj 2015:** Málið umrøtt.

**Býráðið fyri læstum hurðum 21. mai 2015:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**

Endalig avkláring uppá mvg. spurningin fyriliggur ikki enn, men væntar Bústaðir at ein loysn finst fyri hesum og arbeiðir Bústaðir við upprunaligu loysnini sum umfatar leigu.

Eitt langtíðarleigumál viðførir, at neyðugt verður at frámatrikulera partin, sum Bústaðir leigar til nýtt matrikul nr.

Um kommunan leigar partar av skúlanum út til Bústaðir, verður neyðugt at tryggja, at Bústaðir rindar allar útreiðslur, sum leigumálið hevur við sær, herundir eisini tær útreiðslur, sum standast av teimum møguligu broytingum av bygninginum, sum verða kravdar í sambandi við frámatrikuleringina. Her verður hugsað um brunamúrar v.m.

Eitt møguligt leigumál skal verða uttan útreiðslur fyri kommununa.

Løgdeildin hevur gjørt eitt uppskot til leigumál, sí skjal nr. 15/01465 – 5

Talan er um 30 ára leigumál við møguleika fyri framlongjan í 10 ár. Tá ið leigumálið gongur út, hevur kommunan rætt til at yvirtaka innrættaðu hølini fyri 75 % av mettum virði. Leigugjaldið er ásett til kr. 1.000 árliga.

**Tilmæli.**
Kommunustjórin og leiðarin á løgdeildini mæla til at leiga Bústaðir uml. 1.440m² av kommunuskúlanum sambært uppskot leigusáttmála, sí skjal nr. 15/01465 – 5.

**Fíggjarnevnd 10. juni 2015:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Sjúrður Olsen og Annfinn Brekkstein taka undir við at leiga Bústaðir uml. 1.440 m² i einum 30 ára leigusáttmála, sum verður at leggja fyri aftur fíggjarnevndina. Málið verður beint í býráðið.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur støðu á einum seinni fundi.

**Býráðsfundir 22. juni 2015:** Fyrst varð atkvøtt um tilmæli frá Tjóðveldi, um at taka Kommunuskúlan niður og at tingast við Bústaðir um at byggja nýggjar lestraríbúðir á staðnum, ið fall við 3 atkvøðum fyri og 8 ímóti.

Fyri atkvøddu: Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen

Greiddi ikki atkvøðu: Elin Lindenskov

Síðan varð atkvøtt um tilmæli frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Elin Lindenskov, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen

Greiddi ikki atkvøðu: Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

**Ískoyti.**
Greitt verður frá málinum. Tilfar kemur til fundin.

**Fíggjarnevnd 28. september 2015:** Kunnað varð um málið, sum verður beint í býráðið.

**Býráðsfundir 30. september 2015:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Frágreiðing og møguligt tilmæli kemur til fundin.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2015:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Tilfar kemur til fundin.

**Fíggjarnevndin 20. januar 2016:** Málið umrøtt og verður lagt fyri aftur á komandi fundi.

**Ískoyti:** Tórshavnar kommuna og Bústaðir eru komin ásamt um treytirnar í einari rammuavtalu fyri verkætlanina at gera Kommunuskúlan til lestrarbústaðir, ið verður løgd fyri fíggjarnevndina og býráðið at góðkenna.

**Tilmæli:** Kommunustjórin og miðfyrisitingarstjórin mæla býráðnum til umvegis fíggjarnevndina at góðkenna fyriliggjandi uppskot til rammuavtalu, j.nr. 15/01465-16 og 15/01465-17.

**Fíggjarnevndin 28. januar 2016:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Sjúrður Olsen og Annfinn Brekkstein, taka undir við tilmælinum og játta kr. 400.000 kr av konto 1313 visandi til § 8 í rammuavtaluni og mæla býráðnum til at góðkenna rammuavtaluna.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur støðu á býráðsfundi.

**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Samtykt við 9 atkvøðum fyri og 2 ímóti.

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrun Mohr, Tróndur Sigurdsson, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen og Jan Christiansen.

Ímóti atkvøddu
Jógvan Arge og Marin Katrina Frýdal

Greiddi ikki atkvøðu:
Jákup Dam

**Ískoyti:**
Kunning um verkætlanina
Vísandi til áður samtykta rammuavtalu millum Tórshavnar kommunu og Bústaðir, varð verkætlanin at høvuðsumvæla verandi Tórshavnar Kommunuskúla til lestraríbúðir v.m. bjóðað út millum tveir høvuðsarbeiðstakarar. Tilboð komu inn 16. mars 2016. Tilboðini uppá handverkaraútreiðslur uttan mvg vórðu:

| | |
| --- | --- |
| Eysturlon Sp/f | 54.849.240,00 kr. |
| Húsavarðatænastan Sp/f | 45.735.753,00 kr. |

Ikki bara prísurin hevði týdning, men dømast skuldi eftir fleiri kriterium. Ein verkætlanarbólkur av fólki frá TK, Bústaðir og ráðgevum gjørdi eina innanhýsis meting/døming av innkomna tilfarinum, har komið varð fram til, at Húsavarðatænastan (HVT) hevði eitt betri samlað tilboð.

Hesi boðini vórðu givin arbeiðstakarum 22.03.2016. Eftir samtykki frá stýrisbólkinum fyri verkætlanina, varð farið undir samráðingar við HVT.

Samráðingarnar eru komnar á mál, og samlaði verkætlanarkostnaðurin sær nú soleiðis út :

| | | |
|---|---|---|
| Fyrireiking | Kr. | 634.854,00 |
| Arbeiðstakaraútreiðslur | Kr. | 43.516.475,40 |
| Keyp av konstruktiónsverkfr., ókendar útreiðslur og incitament | Kr. | 4.399.336,50 |
| Ráðgeving El | Kr. | 100.000,00 |
| Byggiharraútreiðslur, trygging, íbinding vm. | Kr. | 1.200.000,00 |
| Projektering, projektuppf. og fakeftirlit | Kr. | 2.982.000,00 |
| Verkætlanarleiðsla | Kr. | 340.625,00 |
| Útreiðslur í smb. við arbeiðstakaratillutan | Kr. | 100.000,00 |
| | | |
| Í alt uttan MVG | Kr. | 52.979.290,90 |

Viðlagt er sáttmáli til partalag, organisatiónsdiagram, ráðgevaraavtala og arbeiðstakarasáttmáli saman við tíðarætlan.

Parturin av handverkaraútreiðslum hjá Tórshavnar kommunu verður at rinda klimaskermin, tó uttan altanir. Restin rindar Bústaðir.

Parturin hjá Tórshavnar Kommunu við øllum er:

| | | |
|---|---|---|
| Handverkaraútreiðslur og byggiplássútreiðslur | Kr. | 12.841.212,00 |
| Ókent og Incitament (33%) | Kr. | 1.354.761,00 |
| Ráðgeving (33%) | Kr. | 984.060,00 |
| Verkætlanarleiðsla | Kr. | 340.625,00 |
| | | |
| Tilsamans | Kr. | 15.520.658,00 |
| Mvg kostnaður tils., verkætlanarleiðsla ikki íroknað | Kr. | 608.127,00 |
| TK, tilsamans við Mvg | Kr. | 16.128.785,00 |

Útyvir hetta, verður í løtuni serskilt arbeitt við at gera drening av kjallaraveggum og sokkli um bygningin og íbinding til kloakk, umframt nýggja parkeringsloysn oman við Tróndargøtu. Umsitingin vendur aftur, tá hesin kostnaður er kendur. Arbeiðið hevur alla tíð verið uttanfyri verandi verkætlan. Hetta arbeiðið skal samskipast við gerð av garðprosjekt seinni.

Sambært rammuavtalu skal TK skeyta Bústaði ognina matr. 339 Tórshavn, burtursæð frá vonginum móti Tróndargøtu, sum er fimleikahøll og rúm tilknýtt fimleikahøll.
Viðlagt er uppskot til skeyti.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, trivnaðarstjórin og kommunustjórin mæla til at játta kr. 16.129.000,00 til verkætlanina at høvuðsumvæla Tórshavnar kommunuskúla og at taka undir við uppskotinum til skeyti.
Partur av fígging er framflytingar av roknskaparári 2015 kr. 12.155.000,00.

**Fíggjarnevndin 19. april 2016:** Fundurin niðurlagdur.

**Tilmæli**
Tekniski stjórin, trivnaðarstjórin og kommunustjórin mæla til at játta kr. 16.129.000,00 til verkætlanina at høvuðsumvæla Tórshavnar kommunuskúla og at taka undir við uppskotinum til skeyti.

Partur av fígging er framflytingar av roknskaparári 2015 kr. 12.155.000,00.

Í restandi 3.974.000 mió. kr. verður fíggja soleiðis:

| | | |
|---|---|---|
| 8175 | Framfluttur løgukarmur, Glyvursvegur við Brúgv | 415.000 |
| 5775 | Framfluttur løgukarmur, Golfvøllur | 400.000 |
| 5775 | L54016, Golfvøllur | 680.000 |
| 7175 | Framfluttur løgukarmur, Tyrvingarpláss | 2.479.000 |

Hædd verður tikið fyri játtanini til tyrvingarpláss í fíggjarætlanini fyri 2017.

**Fíggjarnevndin 19. april 2016:** Fundurin uppafturtikin.

Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Sjúrður Olsen, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

Jógvan Arge tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðsfundur 19. apríl 2016:** Samtykt við 10 atkvøðum fyri og 3 ímóti.

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Sigrun Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen

Ímóti atkvøddu:
Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

Viðm. frá Tjóðveldi: Vegna mátan at fíggja kommunala partin av meirinntøkunum.

**Býráðsfundur 19. mai 2016:** Samtykt við 10 atkvøðum fyri og 3 ímóti.

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Rúni Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Sigrun Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen

Ímóti atkvøddu:
Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

**Ískoyti:**
Av tí at Bústaðir koma at standa sum eigarar av komandi matrikli, eisini sonevnda listatorninum, ið kommunan fer at reka, er neyðugt at gera brúksavtalu við Bústaðir um, hvussu samstarvið best verður skipað og gjøld í hesum sambandi.

Av tí at Bústaðir formliga eigur ognina og ger nyttu av størstapartinum av henni er best, at Bústaðir tekur sær av og rindar fyri viðlíkahald av høvuðskonstruktiónini o.t., so sum HVS og klimaskermi. Hetta merkir m.a., at um tak, vindeygu ella onnur brek vera, eisini í listatorninum, so tekur Bústaðir sær av og rindar fyri umvælingarnar soleiðis, at kommunan er leys av møguligum óvæntaðum útreiðslum eisini frammi í tíðini.

Hinvegin tekur kommunan sær av øllum innanveggja viðlíkahaldi o.t. av teim hølum, ið kommunan ræður yvir í torninum.

Tingingar hava verið við Bústaðir um hesi viðurskifti. Uppskot til avtalu er í málinum (dokument 32), har m.a. ásett er, at kommunan rindar 13.000 kr./mánaðin til Bústaðir fyri at tryggja at omanfyristandandi verður framt og fyri at tryggja bygningin. Kommunan kemur at taka sær av at halda uttanumøki og ítøkilig avtala skal gerast um vanligan rakstur, m.a. viðvíkjandi reinhaldi.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og løgdeildarleiðarin mæla til, at góðkenna uppskoti til avtalu.

**Fíggjarnevndin 12. desember 2017:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur støðu á einum seinni fundi.

**Býráðsfundur 14. desember 2017:** Atkvøtt varð um meirilutatilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bergun Kass og Gunvør Balle, Annfinn Brekkstein, Bjørg Dam, Bjørghild Djurhuus og Heðin Mortensen.

Blankt atkvøddu: Halla Samuelsen og Tróndur Sigurðsson.

**Ískoyti:**
Verkætlanin er liðug og gjørd upp. Úrslitið er eitt lítið avlop á 7.927 kr. Leisturin hevur verðið øðrvísi enn við aðrar verkætlanir, men sum heild hevur arbeiðið gingið væl og samstarvið við allar partar í verkætlanini hevur verið gott.
Harafturat kann nevnast, at verkætlanin hevur verðið eitt positivt íkast til býarmyndina, lyft ein eldri bygning upp og skapt trivnað fyri eitt økið, har lítið virksemi var áður eftir at skúlin varð stongdur.

**Tilmæli:**
Tekniski stjóri, býararkitekturin og leiðarin fyri verkætlanardeildini mæla fíggjarnevndini at samtykkja at loka verkætlanina og at avlopið verður flutt á løgukarmin. Málið verður beint í býráðið.

**Fíggjarnevndin 23. januar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til kunningar.

**Býráðsfundur 31. januar 2019:** Kunnað varð um málið.

# 22/19 Golfvøllur – broyting av byggisamtykt

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.02.2019 | 25/19 | 19/00427-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 31.01.2019 | 30/19 | 19/00427-1 |
| 3 Býráðsfundur | 31.01.2019 | 22/19 | 19/00427-1 |

**Upprunin til málið:**
Í 2017 varð samtykt at taka uppaftur samráðingarnar um lendi til golfvøll á Glyvursnesi og at endurskoða verkætlanaruppskotið til golfvøll á Glyvursnesi, sum varð gjørt í 2013.

Golfvallarætlanin er skipað við 18 holum, men er ætlanin einans at byrja við at byggja vøllin við 9 holum, sí s. 7 í skjalinum *Verkætlan golfvøllur á Glyvursnesi 2017.pdf.*

Økið, sum ætlanin er at nýta til golfvirksemi, liggur í D2 øki og í 4. Grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Um loyvi skal verða at spæla golf á øllum økinum, má hetta broytast til D2 øki, ætlað ítrótti og øðrum.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Tórshavnar Golffelag varð stovnað í 1989. Fyrstu árini varð spælt uppi á Vatnaskørðum á lendi, sum varð leigað frá bóndanum, og seinnu árini hevur felagið spælt á lendinum hjá bóndanum úti á Glyvursnesi. Í báðum førum hevur talan verið um óviðgjørdan golfvøll, t.v.s. at lendið ikki er gjørt til golf.

Í 2013 varð eitt verkætlanaruppskot sent Tórshavnar býráði um nýggjan golfvøll á Glyvursnesi, og í 2017 varð hetta, eftir áheitan frá býráðnum, tillagað soleiðis, at bygdur verður golfvøllur við 9 holum – 3 hol um árið, við møguleika fyri at byggja vøllin út til 18 hol seinni. Sambært uppskotinum verða tey fyrstu nýggju holini klár í 2021-22.

Sum liður í heildarætlanini fyri golfvøllin, verða somuleiðis umrøddir møguleikar at integrera golfvallarútbyggingina við tyrvingarætlanina og við arbeiðið hjá Tórshavnar havn í nýggja grótbrotinum. M.a. vísir frágreiðingin á dømi úti í heimi, har grótbrot eru integreraði við golfvallir.

Í heildarætlanini fyri golfvøllin, verður gamla grótbrotið nýtt til venjing, undirvísing og upphiting. Hendan ætlanin er tó ikki partur av fyrsta stigi í verkætlanini, og av tí, at gamla grótbrotið verður nýtt til annað virksemi í løtuni (Hjálpirót og annað vinnuligt virksemi), verður mælt til, at hetta økið framhaldandi liggur sum B11 vinnuøki, og verður broytt til D2, tá golfvallarætlanin er komin longur.

Í sambandi við nýggja grótbrotið á Glyvursnesi, so fer umsitingin hjá Tórshavnar kommunu, saman við LOA-fonden (lokale og anlægsfonden), undir at kanna møguleikarnar til virksemi við nýggja grótbrotið, og verður almenna byggisamtyktin fyri økið við nýggja grótbrotið væntandi broytt sambært hesum ætlanum

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri D2 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu eru:

*§23, stk. 3 Umráðisparturin D2 verður kannaður ítrótti og øðrum, sum eftir eini heildarætlan fyri alt økið ella ein part av økinum kann virka saman við ítróttinum*

*Stk. 5 Byggistigið má innan fyri eitt náttúrliga avmarkað øki í D2 og D3 ikki fara upp um 0,25 og nýtslustigið ikki fara upp um 0,5.*

*Stk. 6 Útstykking innan fyri umráðispartarnar D2 og D3 verður einans loyvd eftir serstakari byggisamtykt.*

Ásetingar fyri 4. Grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu eru m.a.:

*§26, stk. 1 4. Grundumráði verður í høvuðsheitum nýtt til landbúnað og alment frílendi og tílíkt.*

*Stk. 2 Loyvt verður einans at byggja fjós, úthús og annað, sum hevur við vanligt traða- og jarðarbrúk at gera.*

**Upplýsingar frá umsitingini**
Tórshavnar kommuna samskiftir í løtuni við Búnaðarstovuna um at útvega lendi til golfvallarætlanina, sí mál *Tórshavnar golfklubbi: umsókn um stuðul til byggjan av golfvølli og felagshúsi,* journal nr. 14/04756.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
*LOA-fonden: Undersøgelse af idræt og kultur på Færøerne,* journal nr. 18/01114.
*Tórshavnar golfklubbi: Umsókn um stuðul til byggjan av golfvølli og felagshúsi,* journal nr. 14/04756.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
*Eftir broyting,* journal nr. 19/00427-4
*Áðrenn broyting,* journal nr. 19/00427-4
*Verkætlan golfvøllur á Glyvursnesi 2017,* journal nr. 19/00427-3.
*Verkætlanaruppskot til golfvøll á Glyvursnesi 2013,* journal nr. 19/00427-3.
*Tórshavnar Golfklubbi: Umsókn um stuðul til byggjan av golfvølli og felagshúsi,* journal nr. 14/04756-36.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>31. januar 2019 | Blað nr.: 92<br>Formansins merki: |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☒

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at broyta almennu byggisamtyktina fyri økið við golfvøllin á Glyvursnesi sambært kortskjali, j.nr. 19/00427-4 og beina málið í býráðið**:**

**Fíggjarnevndin 31. januar 2019:** Útsett.

**Býráðsfundur 31. januar 2019:** Tikið av skrá.

# 23/19 Útboð av útbygging av Býlingshúsinum Vesturi á Flat

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 30.01.2019 | 34/19 | 19/00411-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 31.01.2019 | 31/19 | 19/00411-1 |
| 3 Býráðsfundur | 31.01.2019 | 23/19 | 19/00411-1 |

**Upprunin til málið:**
Víst verður til mál 18/03521 Útvega fleiri dagstovnapláss, har ein av ætlaðu verkætlanum er at útbyggja Býlingshúsið vesturi á Flat. Ávíst fyrireikingararbeiðið hevur verið í hesum sambandi, har kostnaðarmetingar og tilboð eru fingin til vega fyri útbyggingini. Nú kommunan hevur leigað skúlalonina í Hoydølum og at talan er um stóra íløgu, verður mett skilabest, at arbeiðið verður boðið út á annan hátt, enn gjørt er. At annar leistur verður valdur kann hava við sær útreiðslur fyri kommununa um krav verður sett fram um gjald fyri útint arbeiði hesum viðvíkjandi.

Mett verður skilabest at bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión til tríggjuar arbeiðstakarar sum heildarveiting (totalentreprisa).

Ætlanin er at byggja Býlingshúsið vesturi á Flat út við fýra nýggjum stovum, so at stovnurin fer at hava sjey stovur. Víst verður í hesum sambandi til mál 18/03848 Staðseting av nýggjum og víðkan av dagstovnum, har økið er sett av til endamálið. Krav til byggingina verður harumframt betri parkeringsumstøður í økinum.

Til tess at bjóða arbeiðið út, skal gerast útbjóðingartilfar, ið lýsir hølistørv, bygningskrøv, funktión v.m. Neyðugt er í hesum sambandi at seta av upphædd til fyrireikingar, ið mett verður kr. 100.000 ætlað ráðgeving, umframt samsýning til teir bjóðandi, ið ikki fáa arbeiðstøkusáttmála. Skotið verður í hesum sambandi upp kr. 75.000 í samsýning. Tilsamans er fíggjartørvurin til hesa tilgongdina kr. 250.000.
Á løgukarmi á grein 3 Børn og ung konta 3175 Barnaansing fyri 2019 eru í alt settar kr. 20 mió av til dagstovnar.

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin fyri barna- og ungdómsdeildina mæla til at fáa heimild til at gera útbjóðingartilfar og at bjóða út arbeiðið at útbyggja Býlingshúsið vesturi á Flat í innbodnari lisitatión til tríggjar arbeiðstakarar sum heildarveiting (totalentreprisa), og at gera avtalu um ráðgeving í hesum sambandi. Harumframt verður mælt til at játta kr. 250.000 av løgukarmi 3175 Barnaansing til nýggja løgukontu Útbygging Býlingshúsið vesturi á Flat.

**Mentamálanevndin 30. januar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 31. januar 2019:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 31. januar 2019:** Einmælt samtykt.

Turið Horn luttók ikki í viðgerðini av málinum vísandi til, at hon er ógegnið.

# 24/19 Útboð av útbygging av Dagstovninum á Hamrinum, Argir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 30.01.2019 | 35/19 | 19/00412-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 31.01.2019 | 32/19 | 19/00412-1 |
| 3 Býráðsfundur | 31.01.2019 | 24/19 | 19/00412-1 |

**Upprunin til málið:**
Víst verður til mál 18/03521 Útvega fleiri dagstovnapláss, har ein av ætlaðu verkætlanum er at útbyggja Dagstovnin á Hamrinum. Ávíst fyrireikingararbeiðið hevur verið í hesum sambandi, har kostnaðarmetingar og tilboð eru fingin til vega fyri útbyggingini. Nú kommunan hevur leigað skúlalonina í Hoydølum og at talan er um stóra íløgu, verður mett skilabest, at arbeiðið verður boðið út á annan hátt, enn gjørt er. At annar leistur verður valdur kann hava við sær útreiðslur fyri kommununa um krav verður sett fram um gjald fyri útint arbeiði hesum viðvíkjandi.

Mett verður skilabest at bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión til tríggjuar arbeiðstakarar sum heildarveiting (totalentreprisa).

Ætlanin er at byggja Dagstovnin á Hamrinum út við tveimum nýggjum stovum, so at stovnurin fer at hava sekst stovur. Víst verður í hesum sambandi til mál 18/03848 Staðseting av nýggjum og víðkan av dagstovnum, har økið er sett av til endamálið. Tørvur á møguligum meira lendi kann takast upp seinni.

Til tess at bjóða arbeiðið út, skal gerast útbjóðingartilfar, ið lýsir hølistørv, bygningskrøv, funktión v.m. Neyðugt er í hesum sambandi at seta av upphædd til fyrireikingar, ið mett verður kr. 100.000 ætlað ráðgeving, umframt samsýning til teir bjóðandi, ið ikki fáa arbeiðstøkusáttmála. Skotið verður í hesum sambandi upp kr. 75.000 í samsýning. Tilsamans er fíggjartørvurin til hesa tilgongdina kr. 250.000.

Á løgukarmi á grein 3 Børn og ung konta 3175 Barnaansing fyri 2019 eru í alt settar kr. 20 mió av til dagstovnar.

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin fyri barna- og ungdómsdeildina mæla til at fáa heimild til at gera útbjóðingartilfar og at bjóða út arbeiðið at útbyggja Dagstovnin á Hamrinum í innbodnari lisitatión til tríggjar arbeiðstakarar sum heildarveiting (totalentreprisa), og at gera avtalu um ráðgeving í hesum sambandi. Harumframt verður mælt til at játta kr. 250.000 av løgukarmi 3175 Barnaansing til nýggja løgukontu Útbygging Dagstovnurin á Hamrinum.

**Mentamálanevndin 30. januar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 31. januar 2019:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 31. januar 2019:** Samtykt við 8 atkvøðum fyri, ongari ímóti og fimm blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Sjúrður Olsen, Bergun Kass og Annfinn Brekkstein.

Blankt atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Bjørg Dam.

**FUNDURIN LOKIN KL. 20:15**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Annika Jacobina Olsen | Helena á Dam Neystabø | Tróndur Sigurðsson |
| Halla Samuelsen | Annfinn Brekkstein | Jákup Dam |
| Marin Katrina Ragnarsdóttir Frýdal | Bjørghild Djurhuus | Gunvør Balle |
| Turið Horn | Bergun Kass | Bjørg Dam |
| | Sjúrður Johan Olsen | |